FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 309 Hósdagur 15. januar 2004 12,-

Baksíðan



## Føðingardagurin hjá Jonu

## Útróður á Eiði

3. partur av áhugaverdu frásøgnini hjá Símun Johan Wolles.

Síða 11

## Landsfundur FFs

Frásøgn frá landsfundi FFs saman við frágreiðing um mál, ið ikki verða nevnd í valstríðnum.

Síða 6



Vit vóru framsýningartúr við "Finni Fríða" og hittu fleiri av kvinnunum aftan fyri menninar.

Síða 14

# Finnur Fríði

Kanningin hjá útvarpinum:

# Víst eru fjølmiðlarnir óálítandi!

Síða 20

Gallupkanning hjá útvarpinum hevur staðfest, at fólk hava ikki álit á teimum stóru fjølmiðlunum. Men við teirra hugburði er eingin vón um bata!

Síða 2 & 5

## Til minnis um Sofus og Ismar







Umboð: Thorleif Samuelsen
Undir Gráasteini 68 · Tórshavn
Tlf: 31 77 13 · Fartlf: 28 31 38
E-mail: thorsam@post.olivant.fo







KÄRCHER

Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.
Vit umvæla eisini
TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

**FF-blaðið:** Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
**Útgevari:** Føroya Fiskimannafelag

**Blaðstjóri:** Óli Jacobsen
**Layout:** Føroya Fiskimannafelag
**Prenttilgerð:** Føroya Fiskimannafelag
**Prent:** Prentmiðstøðin

**Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin**

**- kemur út annanhvønn hósdag**

# Til minnis um Sofus Jakobsen

Tað mundi skaka øll, sum kendu Sofus, at frætta um at hann var farin so knappliga - beint fyri jól tann 22. desember, bert 68 ára gamal. Hann var jú tann virkisfýsni maðurin, sum røkti so nógvar uppgávur á ymiskum økjum, og nú var hann knappliga ikki meira.



*Sofus og Agnas.*

Sofus var klaksvíkingur, sonur Dagmar og Hans Jacob Jacobsen. Hans Jacob var ættaður av Skipanesi sonur Tummas í Grønuskriðu, og tað var hetta, sum gjørdi okkum báðar til skyldmenn, triði og fjórði, og høvdu vit hetta javnan á orði, tá vit hittust. Hans Jacob og Dagmar búðu fyrst úti í Oyri og seinni undir Heygnum. Tey vóru fimm systkin, men nú eru bert tvey eftir, og tey eru Julian í Klaksvík og Anna Malena í Havn.

Sum vanligt var hjá ungum dreingjum, fór Sofus til skips, tá hann fór úr skúlanum. Síðani fór hann í smiðjulæru og so á maskinskúla. Hann sigldi eina tíð, men vildi nakað annað enn at sigla. Seinnapartin av 50-unum, fór hann til Danmarkar at lesa til verkfrøðing. Her hitti hann Agnas, dóttir Jóhonnu og Hans Sundstein, sum lærdi til sjúkrasystir, og tey giftust í 1959. Við Agnas havi eg eitt annað samband - nevniliga, at mammur okkara eru uppvaksnar í sama túni í Konradsbrekku, har ættirnar enn búgva lið um lið.

Tey bæði fingu børnini Árni, f. 1959, giftur Jóruni, Bjarni, f. 1963, giftur Óluvu, Finn, f. 1967, giftur Eyð - og Elin, f. 1973, gift Jógvani. Tey hava sett 13 barnabørn við, sum vóru eitt og alt hjá Sofusi og Agnas. Júst nú vóru øll børnini í Føroyum, so familjan kundi halda jól saman; men soleiðis skuldi ikki ganga.

Sofus arbeiddi fyrst sum verkfrøðingur í Danmark, og tey fluttu til Føroyar í 1969. Agnas fór at arbeiða sum sjúkrasystir, meðan Sofus fór at arbeiða sum ráðgevandi verkfrøðingur. So við og við hevði Sofus uppbygt eina verkfrøðingafyritøku, har 7 fólk starvaðust nú. Millum hesi vóru eisini synirnir Árni og Bjarni, sum júst høvdu yvirtikið leiðsluna av virkinum, so pápin kundi taka sær eitt sindur meira av løttum. Sofus hevði gott orð á sær millum fakfólk, sum ein, ið var álítandi í øllum, sum hann hevði við at gera. Tað sigur heldur ikki so lítið, at Sofus hevur verið við í fleiri enn 500 smærri og størri verkætlanum. Ein av hesum er nýggi parturin av landssjúkrahúsinum.

Sofus hevði eisini stóran áhuga fyri fiskivinnu, og hetta fingu vit eisini ofta eitt prát um. Hann var ein av teimum sum fast fekk okkara ársfrágreiðing sendandi.

Sofus hevði eisini ein virknan leiklut í Ebenezer, har hann fyri ein stóran part tók sær av tí praktiska. Tað varð eisini sagt til jarðarferðina, at var avtala gjørd við Sofus um, at nakað skuldi gerast, so var óneyðugt at hugsa meira um tað, tí so varð tað gjørt. Ongantíð bar hann seg undan, tá okkurt skuldi gerast. Í Ebenezer kemur nógv fólk, men Sofus legði sær eina við at práta við tey, sum komu har, so tey skuldu kenna seg heima. Hetta var ikki minst galdandi fyri tey ungu, sum høvdu hansara serliga áhuga. Vit hava sjálvi ung fólk í húsinum, sum minnast honum hetta við takksemi.

Vit hittust rættiliga ofta. Vit høvdu báðir postboks á posthúsinum í miðbýnum, og vit fingu altíð eitt prát. Lagnan vildi tað soleiðis, at vit hittust uttanfyri posthúsið seinastu ferð, og vit komu at fylgjast hansara seinastu ferð her á fold, har eg kundi geva honum eina hond. Her mátti sannast enn eina ferð, at skjótt er Harranum um.

At Sofus var væl umtóktur, sást eisini á tí stóra skara, sum fylgdi honum til gravar 3. jóladag. Í talunum í Ebenezer kom eisini fram, hvussu Sofus hevði arbeitt í tí stilla, uttan at gera háva burturúr sær. Tí verður hann eisini nógv saknaður í hesum arbeiði.

Vit eru mong, sum fara at sakna Sofus, og vilja vit minnast hann við virðing.

*ó.*



*Sofus saman við abbabørnum.*

Reyði Krossur Føroya

## Hvør er Arsins Fyrstahjálpari 2003?

Reyði Krossur Føroya sóknast eftir evnum at heiðra sum "Ársins Fyrstahjálpara 2003"

Tann, sum verður kosin "Ársins Fyrstahjálpari 2003", fær heiðirsbræv frá Reyða Krossi Føroya og eina peningagávu, ið Tryggingarfelagið Føroyar letur.

Tann, sum er í uppskoti, skal í farna ári á serligan hátt hava givið kropsliga ella sálarliga fyrstuhjálp.

Endamálið er ikki einans at tilnevna "Ársins Fyrstahjálpara 2003", men eisini at eggja øðrum at læra seg fyrstuhjálp, so fleiri mannalív kunnu bjargast.

Politi, Bjargingarfeløg, virkir, stovnar og einstaklingar kunnu lata inn uppskot, ið verða viðgjørd av nevndini í Reyða Krossi Føroya.

Serligt oyðublað, ið er sent politistøðunum kring landið og annars fæst frá Reyða Krossi., verður at senda *Reyða Krossi Føroya* í seinasta lagi 31. januar 2004.

Ætlanin er at tilnevna "Ársins Fyrstahjálpara 2003" tann 17. februar 2004.

## Rætting til myndatekst:

Í seinasta blað høvdu vit eina mynd av teimum, sum bygdu turkihúsið í Syðrugøtu í 1929. Her er komið bland í myndatekstin, soleiðis at brøðurnir Tummas og Jóan Magnus Thomsen er "umbýttir". Hetta merkir, at tann sum á myndini er sagdur at vera Tummas er Jóan Magnus og øvugt.



**Vit gera allar vanligar bilumvælingar sera bíliga - so sum:**

Oljuskift, motorjusteringar

Umvæla bremsir, koplingar v.m.

For- og bakhjólsleiðir og akslar

Og so hava vit tey vælumtóktu "TYFOON" dekkini, sum vit skifta

**Sp/f Úrvalsbilar**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444943 · 281943 · 217704

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

*Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er fyrisiting av persónsupplýsingarlógini.*

*Dátueftirlitið er ein óheftur fyristingarmyndugleiki, sum vísir til Løgmálaráðið.*

*Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu og hevur eftirlit við allari viðgerð, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum fevnir um.*

*Dagliga virksemið hjá Dátueftirlitinum verður røkt av avgreiðsluskrivstovuni. Ráðið, sum landsstýrismaðurin setir, er skipað við formanni og 2 øðrum limum.*

*Eftirlitið hevur av sínum eintingum ella eftir klagu frá einum skrásettum eftirlit við, at øll viðgerð, sum lógin fevnir um, bert fer fram í samsvari við lógina.*

*Av øðrum uppgávum kann nevnast vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum viðvíkjandi skráseting og viðarigeving av persónsupplýsingum, viðgerð av klagum og málum, sum ráðið av sínum eintingum hevur tikið upp, og viðgerð av fráboðanum og umsóknum um loyvir.*

*Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum hjá almennum myndugleikum og hjá privatum.*

*Dátueftirlitið skal geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum og annars virka fyri góðum dátuviðgerðarsiði.*

# Fulltrúi til Dátueftirlitið

**Í sambandi við, at fulltrúi á Dátueftirlitinum fer í barnsburðarfarloyvi, verður við hesum søkt eftir avloysara í tíðarskeiðnum 1. mars 2004 til 1. januar 2005.**

**Uppgávur**
Viðkomandi hevur dagligu leiðsluna og ábyrgdina av Dátueftirlitinum. Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna um málsviðgerð, vegleiðing og ráðgeving, fundarfyrireiking og luttøku á ráðsfundum, umframt kunnandi virksemi, herundir dagføring av heimasíðu við kunnandi tilfari og gera ársfrágreiðing.

**Faklig førleikakrøv**
Krav er, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærusetri innan samfelagsvísindi so sum løgfrøði, útbúgving innan almenna fyrisiting ella líknandi útbúgving.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Viðkomandi skal hava hug og evni at arbeiða sjálvstøðugt og evni skrivliga at málbera seg lýtaleyst á føroyskum. Kunnleiki til edv á vanligum brúkarastøði krevst.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Kitty May Ellefsen, fulltrúa á Dátueftirlitinum, tlf. 314763, fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

***Dátueftirlitinum***
*Tinganes*
*Postboks 64*
*FR-110 Tórshavn*

og skulu vera Dátueftirlitinum í hendi í seinasta lagi 23. januar 2004.

FISKIMÁLARÁÐIÐ
FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

# Ófulltikin dekkari til Fiskiveiðieftirlitið

Eitt starv sum ófulltikin dekkari verður hervið lýst leyst at seta skjótast gjørligt.

Ert tú ung/ungur, og hevur hug til arbeiði umborð á skipi, er hetta ein góður møguleiki.

Starvstíðin sum ófulltikin dekkari telur á sama hátt sum starvstíð við handilsskipum

Arbeiðið umfatar at ganga vakt, og annars vanligt deksarbeiði.

**Førleikakrøv:**

- Heilsuváttan fyri sjófólk (uttan avmarkingar og er skikkaður til kagtænastu)
- Trygdarskeið (Fyrimunur men ikki krav)

Setanartreytir og løn eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið er Fiskimálaráðið og stovnar undir tí. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið, Vaktar- og Bjargingartænastan.

**Setanin er avmarkað til tvey ár.**

Skrivlig umsókn við CV, saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 22. januar 2004 kl. 1200.

Umsóknir skulu sendast til:

**FISKIMÁLARÁÐIÐ**
**Att.: Fiskiveiðieftirlitið**
**Postsmoga 347**
**110 Tórshavn**

*Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara.*




BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

**Pf. Petur Larsen**

Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

# Dekkarar

Søkt verður eftir 2 dekkarum til Magnus Heinason. Setanin tekur við í februar 2004.

Persónar, ið settir verða, skulu hava heilsuváttan fyri sjómenn. Umframt skulu teir hava góð samstarvsevni og hava góðan røkiskap. Tað er ein avgjørdur fyrimunur at hava góðan kunnleika til trolreiðskap.

Lønar- og setanartreytir eru smbr. sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja 353900 til Eli Christiansen, reiðara, e-post elichr@frs.fo.

Umsóknarfreistin er mánadagin 19. januar 2004.

Skrivligar umsóknir við viðmælum e.l. skulu sendast til

**Fiskirannsóknarstovuna**
**Nóatún 1**
**Postboks 3051**
**FO-110 Tórshavn**

FF-blaðið www.fiskimannafelag.fo
Gerst haldari fyri einans 50 krónur um ársfjórðingin

# Aðalfundur hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag


*Jacob Vestergaard.*

Sama dag, sum Føroya Fiskimannafelag hevði sín landsfund, hevði Skipara- og Navigatørfelagið (FSN) aðalfund eisini í Norðurlandahúsinum. Ársfrágreiðingin hjá formanninum Ellinti Abrahamsen snúði seg fyri ein stóran part um tær samráðingar, sum felagið hevur havt. Vit hava fyrr her í blaðnum havt tann partin av frágreiðingini, sum snýr seg um samráðingarnar við Føroya Reiðarafelag.

FSN stríðist fyri ein stóran part við somu mál sum FF, og tað er eitt rættiliga gott samstarv millum feløgini um mál av felags áhuga.

Eitt av hesum málum er trivnaðurin umborð, og vit endurgeva her tann partin av frágreiðingini, sum snýr seg um hesi viðurskifti, har stóri parturin snýr seg um virksemið í samstarvsráðnum hjá Skipaeftirlitinum. Her verður sagt:

Samstarvsráðið:
Í sambandi við yvirtøku av Skipaeftirlitinum er skipað eitt samstarvsráð. Í § 44 í løgtingslóg um trygd á sjónum, nr. 165 frá 21. desembur 2001 stendur:

Landstýrismaðurin tilnevnir samstarvsráðið, ið hevur 10 limir, og hvørs starv er:

a) at ráðgeva landstýrismanninum og skipaeftirlitinum í øllum málum, ið hava við trygd á sjónum, arbeiðsumhvørvi umborð og fyribyrging av havdálking at gera.

b) at ráðleggja landstýrismanninum um uppskot til lógir og reglur við heimild í lóggávuni, og

c) at koma við tilmælum og uppskotum viðvíkjandi lóggávuni um trygd á sjónum og umsitingini av lóggávuni.

Nevndin í FSN hevur mælt landsstýrismanninum í fiskivinnumálum til, at tann til eina og hvørja tíð verandi formaður í FSN, í løtuni eg sjálvur, skal umboða FSN, sum fastur limur. Nevndin hevur eisini avgjørt, at Jákup Müller skal vera varalimur. Landsstýrismaðurin hevur fylgt tilmælunum.

Samstarvsráðið byrjaði sítt arbeiði tíðliga síðsta heyst. Formaður í ráðnum er Kristin Rasmussen.

Ráðið hevur millum annað gjørt uppskot til nýggja medisinkistu fyri føroysk skip.

Uppskotið til kunngerðina inniber, at skiparin og minst ein aftrat honum skal á skeið, ið varir í 5 dagar.

Sagt varð á síðsta aðalfundi, at kunngerðin kemur væntandi í gildi fyrst í komandi ári, men enn er hon ikki lýst.

Tað eru tveir spurningar, sum fyri okkum í FSN eru avgerandi at fáa við, men sum ikki høvdu vunnið frama so seint sum á síðsta fundi, málið var fyri, og teir eru:

At tað ikki "bert" eru Skipaeftirlitið og Landsapotekarin, sum avgera, hvat skal vera í skipsmedisinkistuni, men umboðini fyri FSN hava biðið um, at tað skulu vera Landsapotekarin saman við yvirlæknanum á deildini fyri Arbeiðs- og Almanna Heilsu og Skipaeftirlitið, sum avgera, hvat skal vera í skipsmedisinkistuni.

Í Danmark er tað SØFARTSSTYRELSEN saman við SUNDHEDSSTYRELSEN, sum avger, hvat skal vera í medisinkistuni, men munurin millum SØFARTSSTYRELSEN í Danmark og Skipaeftirlitið í Føroyum er, at ein ella fleiri læknar eru knýttir beinleiðis til SØFARTSSTYRELSEN, meðan eingin lækni er knýttur at Skipaeftirlitinum.

Um vit høvdu fingið yvirlæknan á Deildini fyri Almanna Heilsu knýttan at Skipaeftirlitinum, so hevði tað sjálvsagt verið enn betri.

Ígildissetan: Hin parturin er ígildissetan av kunngerðini. Umboðini fyri FSN hava biðið um, at kunngerðin verður sett í gildi "líðandi," soleiðis, at ein raðfesting verður gjørd, nær kunngerðin fær gildi fyri tað ávísa skipið. Ætlanin við hesum er, at so hava viðgerarnir á tí ávísa skipinum havt høvi til at vera á skeiði í nýtslu av medisinkistuni, áðrenn skipið, ein er við, fær kistuna umborð. Tað verður í nýggju kunngerðini krav, at viðgerarnir skulu hava verið á skeiði í at nýta nýggju medisinkistuna, áðrenn hon kemur umborð, og er hetta tí neyðugt fyri at sleppa undan, at skiparin og hin viðgerin, sum verður afturat skiparanum, verða lógbrótarar, tá nýggja medisinkistan kemur umborð.

Kunngerð um kanning av vanlukkum á sjónum:
Á síðsta fundi í Skipanarnevndini var til viðgerðar: Uppskot til Kunngerð um kanning av vanlukkum á sjónum.

Uppskotið varð gjøgnumgingið og avgjørt varð at fáa meir at vita, hvussu ein slík kunngerð varð orðað í okkara grannalondum. Viðgerðin heldur væntandi fram fyrst í komandi ári."

Jacob Vestergaard gestarøðari
Eins og Føroya Fiskimannafelag, hevði FSN ein gestarøðara og var tað virkandi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard. Hann greiddi fyrst og fremst frá síni fatan av lógini um vinnuligan fiskiskap. Men hann legði dent á, at hansara leiklutur framyvir var sera óvissur vegna útskrivingina av løgtingsvali.

Nevndin í FSN sær soleiðis út aftaná aðalfundin:

Ellintur M Abrahamsen, Fuglafjørður, formaður

Regin Nónstein, Hvalba, næstformaður,

Egil Simonsen, Tórshavn

Jákup Gøte, Toftir

Jákup Müller, Runavík
Eyðstein Djurhuus, Tórshavn

Johannes Jacobsen, Viðareiði

Tiltakslimir eru Leivur Christiansen, Jógvan L. Gregersen, Harry á Lakjuni og Dánjal Jákup Jørgensen.


*Fundarfólk. Fremst formaður Ellintur Abrahamsen.*


*Fundarfólk.*

# Til minnis um Ismar



*Her síggja vit Ismar, sonin Jóannes, og Elsu í handlinum í 2000. Hetta var ein handil av tí góða gamla slagnum við persónligari tænastu saman við onkrum hittinorði frá Ismar. Handilin høvdu tey í kjallaranum. Uppi á kundi tann, sum skrivar hesar reglur, føla seg sum heima við blíðskapinum og tí milda sinninum hjá Elsu.*

Tann 30. desember doyði Ismar Joensen úr Fuglafirði, 84 ára gamal, og við honum er ein sermektur persónur farin, sum samstundis var ein bygdarmynd í Fuglafirði.

Ismar er ein av teimum, sum eg altíð havi kent. Kennskapurin man vera arvaður frá foreldrum og ætt, so heimið hjá Ismari og Elsu gjørdist eitt heim, har eg altíð havi følt meg heima, og har blíðskapur og hjartaligheit vóru sum fáa staðni. Tað var eisini sjáldan at farið varð til Fuglafjarðar, uttan at vitja Ismar og Elsu.

Foreldrini hjá Ismari vóru Eiðis Jóannes og Malena, sum var úr Fuglafirði, og her settu tey eisini búgv.

Ismar byrjaði tíðliga handilslívið. Sum 15 ára gamal fór hann til Havnar at arbeiða í handlinum hjá Jóhannes Lambaa. Síðani var hann til skips og fekst við ymiskt arbeiði.

Men í 1941 hendi nakað, sum kom at hava avgerandi týdning fyri Ismar alt lívið. Hann fór, saman við 250 øðrum føroyingum, til Íslands at byggja flogvøll fyri bretska hervaldið. Ismar var tjóðskaparmaður um ein háls, og hesum duldi hann ikki fyri. Hann kundi kanska gera meira av enn neyðugt, tá hann førdi fram síni sjónarmið. Hvussu var og ikki, so førdi hetta til, at hann gjørdist Føroya - inntil nú - einasti politiski fangi. Hann varð av bretum førdur til London í hesum sambandi. Men hann gjørdist sjúkur og varð innlagdur á sjúkrahús, og her fekk hann ta andaligu sannføring, sum kom at merkja hann restina av lívinum. Hetta var ein hending, hann tosaði nógv um, og sum hann eisini skrivaði ein bókling um.

Høvuðsstarvið hjá Ismari gjørdist at handla, sum hann byrjaði uppá miðskeiðis í 50-unum. Og hann man hava verið ein tann seinasti, sum hevur handlað uppá gamla mátan við skivu og persónligari tænastu. Hetta var jú nakað heilt annað enn í dag, har tað at fara til handils merkir at keypa tað, ein ætlar, og so at standa í bíðirøð við kassan.

Sum tað varð sagt til jarðarferðina, fekst í handlinum hjá Ismari altíð eitt prát um dagsins støðu, samstundis sum hann útflýggjaði sukur og epli. Ikki var tað bert dagsins støðu í Fuglafirði, sum hevði áhugan hjá Ismari. Hann sveimaði víða, tí hann var sera vitugur og fylgdi væl við. Tað kundi ofta fáast ein yrking saman við keypinum av dagligvørum, so tað var ein serligur dámur at fara at keypa hjá Ismari. Serliga var hann góður við børnini og dugdi væl at práta við tey, og tað hava tey ikki gloymt honum, tá tey gjørdust vaksin.

Sum nevnt var Ismar eisini skald, og tey sum hava skil á slíkum siga, at hann var útyvir tað vanliga. Tá hann fylti 75 ár, varð hansara yrkingasavn "Úr hugans heimi" givið út við umleið 130 yrkingum innan øll møgulig øki. Tvær av hansara týðingum vórðu sungnar av kóri til jarðarferðina. Hann hevur eisini givið annað út. Árini 1945-47 gav hann út kristiliga mánaðarblaðið "Ljós á Leiðini". Tann, sum kennir til blaðútgávu veit, at hetta er ikki bert sum at siga tað at útvega tilfar og at geva blað út regluliga.

Ismar luttók nógv í lokala samfelagnum. Hann var bygdarráðslimur í 12 ár, og hann var formaður í 3½ ár. Hann legði alla sína orku í at menna Fuglafjørð. Í 1965 var hann við til at stovna Havsild, sum gjørdist byrjanin til Havsbrún, sum í dag er ein av størstu fyritøkum, og harvið eitt stórt arbeiðspláss, í landinum.

Vit vóru báðir nevndarlimir á Havsild í fleiri ár. Her kom eisini til sjóndar hansara eyðkenni, at hann ræddist ongantíð at siga sína hugsan. Kanska nakað bondskliga viðhvørt; men eingin kundi vera í iva um, hvar ein hevði Ismar.

Ismar luttók eisini í landspolitikki. Hann stillaði upp fyri Fólkaflokkin gjøgnum nógv val. Hann náddi eisini møta sum varamaður á tingi. Tað slapst ikki undan, at vit tosaðu um politkk, tá vit hittust. Vit vóru ikki altíð samdir um alt, men hetta skilti okkum ikki. Og hann varðveitti sínar hugsjónir alla sína tíð.

Ismar giftist í 1950 við Elsu Leo úr Vági. Hetta man hava verið tað besta, sum er hent honum. Elsa var dóttir Poul Leo, úr Sjúrðhúsi, og konu hansara Sanna. Vit báðir Poul gjørdust sera væl. Vit komu at kennast á ein heldur sjáldsaman hátt. Eg fór at rógva út í Fuglafirði í 1959. Var so ringur av sjóverki, at eg mátti fara heim til Ismar, sum eisini seldi heilivág í handkeypi, at keypa sjóverkstablettir. Men har var eingin heima uttan Poul, sum ikki hevði atgongd til handilin. So eg fekk tablettir, sum hann sjálvur átti. Síðan tá gjørdust vit sera væl, og minnist eg Poul sum eitt framúr fitt og positivt menniskja.

Tað sama kann sigast um Elsu. Hon var á mangan hátt ein mótsetningur hjá Ismari, men júst á ein hátt sum gjørdi, at tey hóskaðu so væl saman. Elsa hevur eitt framúr milt sinnalag, og tað er ikki minst henni fyri at takka, at eg saman við nógvum øðrum altíð hava følt meg so væl inni hjá teimum.

Hvussu sálarliga sterk hon er, sæst eisini av, at hon hevur nú í fleiri mánaðar verið um sonin Jóannes, nú hann hevur verið til sjúkraviðgerð í Danmark.

Tey bæði fingu synirnar Jóannes og Páll. Jóannes hevur hjálpt til í handlinum hjá pápanum, inntil hann varð stongdur í fjør. Eitt eyðkenni fyri Jóannes er hansara ótrúliga vitan um stórt sæð alt. Uttan mun til hvat navn, dato ella árstal spurt verður um, so veit Jóannes tað.

Páll er lærari á Maskinmeistaraskúlanum í Havn. So illa vildi til, at hann vegna sjúku ikki kundi vera við til jarðarferðina hjá pápanum.

Sigast kann, at hesi fýra hava havt eitt fyrimyndarligt heim. Ismar hevur verið veikur í fleiri ár. Hann hevur verið á eldrasambýlinum Vesturstovu, har hann hevur fingið ta umsorgan, sum hann kundi fáa og sum eisini varð takkað fyri á jarðarferðini. Men nú var hansara fjørður rógvin, beint sum Elsa og Jóannes komu heim úr Danmark.

Tað hevur verið stuttligt at kent Ismar og Elsu, sum tey megnarfólk tey hava verið. Vit eru mong sum ynskja eftir, at Jóannes, og eisini Páll, skulu koma fyri seg aftur.

Friður veri við minninum um Ismar.

Óli



*Ismar var í 12 ár limur í kommunustýrinum í Fuglafirði. Hendan myndin er frá 1966 og síggja vit frá vinstru. Aftara rað: Emil Toftegaard, Obert Eliassen, Eli Jensen, av Hellunum, Sámal Kristiansen. Fremra rað: Herluf Bethelsen, Jákup Martin Johannesen og Ismar Joensen. Tá myndin var tikin var Obert formaður. Í dag liva bert tveir eftir, og teir eru Eli og Sámal.*

# Landsfundurin 2003

## Fitt av fólki úr øllum landinum møttu á landsfundi FFs.

Tann 30. desember hevði Føroya Fiskimannafelag sín árliga landsfund í Norðurlandahúsinum. Tilsamans vóru einir 80 mans á fundi, og má hetta sigast at vera hampiligt, hóast tað hava verið landsfundir, har enn fleiri eru møttir. Fundurin verður lagdur millum jól og nýggjár, tí tá hevur verið roknað við, at flestir fiskimenn hava verið heima. Men gongdin er vorðin tann, at nú fara skipini avstað aftur beint eftir jól og hevur hetta so eisini sína ávirkan á møguleikan hjá fiskimonnum at koma á landsfund.

Tað er eyðkent fyri okkara landsfundir, at her eru menn, sum møta trúfast, ár eftir ár. Tað eru teir, sum hava verið við síðan í 60-unum. Vit síggja eisini hvørja ferð nýggj og ung andlit. Menn komu alla staðni frá og eisini frá minstu plássunum, so sum Hesti og Svínoy.

Fundurin byrjaði við, at formaðurin, Óli Jacobsen, bjóðaði fundarfólkinum vælkomnum, og fundurin mintist Marius Olsen í Mikladali, sum doyði í vár, og sum trúliga plagdi at møta á landsfund.

Síðani varð Eyðun Johannesen, næstformaður í FF, valdur til fundarstjóra, og hann gav formanninum orðið at leggja fram sína ársfrágreiðing.

### Ársfrágreiðingin

Ársfrágreiðingin var drúgv sum vanligt, og var hon umleið 100 síður. So tað var bert møguleiki fyri at taka tað týdningarmesta fram í munnligu framløguni. Ein stórur partur av virkseminum hjá felagnum hevur jú verið lýstur so hvørt í FF-blaðnum. Vit hava eisini aðrastaðni í blaðnum tilfar úr ársfrágreiðingini.

Dentur varð lagdur á at fáa fram á fundinum sjónarmið um sáttmálan við Reiðarafelagið. Hann var sum kunnugt uppsagdur til at fara úr gildi 1. desember, men er síðan framlongdur til 15. januar. Hetta er gjørt fyri at geva fiskimonnum møguleika fyri at geva síni sjónarmið til kennar á landsfundinum.

Tað komu eisini fram fleiri sjónarmið, sum FF fer at taka upp í komandi samráðingum.

Eitt, ið kom greitt fram var, at menn hugsa nógv um trygdina og trivnaðin umborð. Tað tykist, sum at lógarreglurnar um hvíld hjá fiskimonnum verða í størri og størri mun settar til viks. Tað koma fleiri og fleiri frásagnir um, at menn kunnu vera til arbeiðis í fleiri samdøgur uttan svøvn.

Vit mugu sjálvsagt viðurkenna, at soleiðis sum fiskiskapur er skipaður, so er hetta nakað, sum kann koma fyri. Er dekkið fult av fiski, má hann sjálvsagt fáast til høldar! Men verður hetta tað, sum javnan hendir, so er rættiligur vandi á ferð fyri heilsuna hjá viðkomandi. Hetta varð eisini váttað av Pál Weihe, tá hetta evnið var frammi. Tað kunnu vera ymsar loysnir fyri teir ymsu veiðubólkarnar. Men fyri ísfiskatrolarar tykist kryvjimaskina umborð at vera loysnin. Hon riggar sera væl til tosk, hýsu og upsa. Tað er serliga tá nógvur upsi er, at tey stóru tørnini eru.

Í øðrum førum verða hvíldarreglurnar brotnar fyri arbeiði, sum eins væl kundi verið gjørt í landi, sum t.d. við garnabátum. Hetta skal heldur ikki kunna bera til, og reglur mugu setast, sum forða fyri hesum.



### Túralongd

Hjá langfaraskipum er túralongdin framvegis eitt mál, sum menn taka fram. Seinast vit samráddust, fekst túralongdin úr 4 niður í 3 mánaðar, og nøkur ár frammaundan fekst longdin frá 5 niður í fýra mánaðar. Hetta er alt mikið gott, men sammett við tær vanligu regurnar fyri sjófólk við farmaskipum, eru fiskimenn framvegis eftirbátar. Her er komið heilt niður á 6 vikur. Menn meta í løtuni 2 mánaðar at vera tað mest hóskandi.

Tað skal sigast, at ásetta túralongdin verður hildin hampiliga væl.

Við verksmiðjutrolarum eru tveir sáttmálar. Ein fyri toskaveiðu og ein fyri kongafiskaveiðu. Hesin seinni eigur at verða endurskoðaður, so meira samsvar verður millum sáttmálarnar.

Reglurnar um, hvør reiðskapur skal vera umborð, tá farið verður, eiga eisini at verða endurskoðaðar.

### Hoyriverndarmóttakarar

Eitt av trivnaðarmálunum, sum vit fingu í sáttmálan seinast, var reglan um "hoyriverndarmóttakarar", har tað m.a. skuldu vera møguligt at hoyra útvarp v.m. Tað kom fram á fundinum, at tað vóru bert nøkur skip, sum høvdu fingið hesa útgerð. Hetta skal sjálvsagt eisini takast upp. Vit vilja framvegis gjarna hoyra frá fiskimonnum, hvussu hetta verður yvirhildið.

Á fundinum varð nógv tosað um áltismannaskipan, sum ikki er nakað serliga virkin umborð á skipum. Her eigur felagið at gera ein serstakan innsats fyri at fáa eina rættiliga álitismannaskipan at virka og at tryggja álitismenn í teirra arbeiði.

Sum heild kann sigast, at sáttmálin verður hampiliga væl yvirhildin. Men spurningurin stingur seg javnan upp um løn fyri arbeiði, sum fiskimenn eiga serstaka løn fyri, sum t.d. landing og tøka av ísi. Tað, sum umrøður her, er at fáa eina skipan, soleiðis at hetta arbeiðið verður givið upp til reiðaran. Her liggur ábyrgdin hjá stýrimanninum. Royndirnar eru, at verður hetta gjørt, er sjáldan trupulleiki við avrokningini.

### Samlagstryggingin

Eitt mál, sum fekk eina serliga viðgerð, var broyting í reglunum hjá samlagstrygingini. Høvuðsbroytingin er, at nú verður eisini tryggjað móti hættisligari sjúku, har staðfesting av ávísum sjúkum merkir eitt skattafrítt gjald uppá kr. 75.000. Hetta merkir, at skipanin á hesum økinum, sum FF og FSN higartil hava havt sum serligar skipanir fyri sínar limir, framyvir verða partur av felags samlagstrygingini.

Hetta merkir aftur, at inngjaldið verður hækkað úr kr. 15 í kr. 17 um dagin, og skal henda hækking, saman við útgoldnum bonus, fíggja broytingarnar.

Hesum broytingum tók landsfundurin í høvuðsheitum undir við tá ársfrágreiðingin varð samtykt.

### Heilsan hjá fiskimonnum

Aftaná viðgerðina av ársfrágreiðingini vóru sum vanligt gestarøðarar, og teir vóru Pál Weihe og Anna Maria Simonsen, sum høvdu framløgur um heilsu hjá fiskimonnum. Hetta er eitt mál, sum hevur verið væl lýst í FF-blaðnum. Tað vísti seg eisini, at stórur áhugi var fyri hesum evni á fundinum. Aðrastaðni í blaðnum hava vit frásøgn frá hesum partinum av fundinum.

Onnur mál á fundinum var val av grannskoðara og ásetan av limagjaldi. Her varð samtykt, at tað skuldi vera, sum tað var.

Ymiskt er altíð á skránni á einum aðalfundi. Her var m.a. tosað um hvussu áhugin hjá fiskimonnum fyri felag sínum kann økjast. Hesin kundi verið nógv størri, men her er sami trupulleikin vist galdandi fyri onnur feløg eisini. Hugskot vóru frammi, sum eiga at verða viðgjørd.

Saman umtikið var talan um ein góðan og sakligan fund.





# Niðurstøða í rættarmálum

Her eru bert nevnd nøkur dømi um, hvussu tann politisk / umsitingarliga skipanin virkar mótvegis borgarum. Stutt sagt kann sigast, at heldur enn at virka sum tænarar hjá borgarunum metir hon borgaran í sínum útgangsstøði sum ein mótpart, sum altíð hevur órætt. Tí ræður um at kunna setur føtur í spenni í einum og hvørjum máli fyri at kunna forða fyri, at hann skal fáa nakran sum helst rætt - í hvussu er við tí góða.

Meira útgreinað er almenni politikkurin á rættarøkinum mótvegis borgarum hesin:

1. Mótsett einum skipaðum samfelag er tað í Føroyum als eingin skipað mannagongd fyri viðgerð av málum, tá borgarin vendir sær til almennu umsitingina.T.v.s. at tað finst ein regla, og hon er, at borgarin skal ikki fáa viðhald. Tí er tað upp til umsitinga sjálva at gera av, um slík mál yvirhøvur skulu fáa nakra málsviðgerð ella sakliga løgfrøðiliga meting, sum kundi endað við, at hann fekk rætt. Tann einasti reelli møguleiki at fáa viðhald er við at fara til Føroya Rætt, sum enn dømir sambært rættargrundreglum í ríkinum. Men tað er bert undantaksvís, at borgarin nýtir hendan møguleika. Tað kann jú kosta bæði stríð og pening at fara til rættin, og annars hevur borgarin kanska álít á, at hansara mál verða viðgjørd, sum tey eiga, og letur sær lynda umrøddu mannagongd.

2. Tað er greitt, at vit eru við at fáa eina serføroyska løgfrøði, sum ikki finst uttanum okkum. Henda løgfrøði er grundað á »politiska viljan«. Tað tykist ikki at standa á hjá einum og hvørjum myndugleika at kunna bíleggja eina og hvørja niðurstøðu, sum hann hevur brúk fyri. Og tað eru enntá niðurstøður, sum stríða ímóti hvørji aðrari, um tað er tað, sum verður ynskt. Mannagongdin er tann, at nýtt verður donsk rættarsiðvenja, so leingi hon tænir endamálinum, men ger hon ikki tað, so verða bert »uppfunnar« serføroyskar rættarreglur, sum stríða beint ímóti teimum donsku. Eitt »gott« dømi um hetta er, tá løgtingið samtykti, at hvørt húski bert skuldi gjalda eitt sjónvarpsgjald. Tá verður bert uppfunnin eini nýggj definitión av orðinum húski, sum sigur, at eitt 18 ára gamalt barn, sum býr heima hjá foreldrunum, skal roknast sum eitt serskilt húski. Hetta er ein »serføroysk« úlegging av hesum orði. Hon fær ikki stuðul nakrastaðni, hvørki í Føroyum ella uttanlands. Yvirhøvur kann sigast, at eitthvørt mál valdast, hvønn og hvat málið snýr seg um. Hetta merkir aftur, at ein føroyskur borgari ongantíð kann vita, um hann er keyptur ella seldur. Sum ein høvuðsregla kemur tað ikki fyri, at ein slík løgfrøðilig »viðgerð« gevur borgaranum viðhald. Her er talan um ein miðvísan poltikk at undirgrava rættarstøðuna hjá borgarunum uttan mun til, um talan er um ein sjúkan fiskimann ella ein almáttugan peningastovn.

3. Ein orsøk fyri vánaligu støðuni er, at eftirlitsskipanin við landsstýrinum als ikki virkar. Eftirlitið skuldi verið framt av løgtinginum við síni landsstýrismálanevnd. Stutt sagt kann siga, at hetta eftirlit bert virkar, tá politiskt gagn kann fáast burturúr viðkomandi máli. Í øðrum førum er løgtingið altíð tøkt til at káva útyvir beinleiðis lógarbrot, sum landsstýrismenn fremja móti borgarum.

4. Tað ringasta er tann hugburður, sum hesin politikkur skapar. Í teirri politisku/umsitingarligu skipanini er einki, sum eitur at royna at loysa trupulleikar hjá borgarunum, sum evt. veruliga kunnu stava frá óhepnum lógarreglum. Tað er heldur einki, sum eitur at royna at loysa praktiskar trupulleikar millum umsiting og borgara. Tað sum vit kenna til, ger umsitingin sær enntá ómak fyri at vera so ólagalig og malsjønskt sum gjørligt.

5. Her er talan um beinleiðis tilætlaðan politikk. Vit fingu tíðliga í ár vitjan av høgtstandandi umboði fyri løgmansumsitingina, sum fekk gjølliga frágreiðing um okkara royndir, sum eisini eru lýstar í hesi ársfrágreiðing. Hetta er sjálvsagt lagt fyri løgmann sjálvum, sum tó ikki hevur tikið nakað sum helst stig, at fáa hesar mannagongdir broyttar. Hetta merkir, at tað er løgmaður, sum persónliga stendur sum »garantur« fyri hesi mannagongd, sum so við og við tykist at verða viðurkend sum verandi »normal«. Henda viðferðin av borgarum verður enntá góðtikin av tí, sum skal eitast at vera andstøða á tingi, og hevur hon minst somu ábyrgd av hesum skili sum »maktin«.

### Kann einki gerast?

Tað er óhugaligt og nærum óhugnaligt, at tað skal kunna bera til ár eftir ár at kunna vísa á beinleiðis rættarloysi og beinleiðis rættarbrot ímóti borgarum landsins, uttan at hetta skal fáa nakra sum helst ávirkan, og at eingin skal gera tað allarminsta fyri at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Hugburðurin tykist at vera heldur at halda fast um eitt skipað rættarloysi enn at geva t.d. FF viðhald í, at her ruggar ikki alt rætt, og tí má nakað gerast fyri at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Tað er óneyðugt at siga, at tað skuldi ikki verið tørvur á hjá borgarum ella tess umboði at havt nakað sum helst stríð av at fáa tey rættindi, sum ein eigur. Men sum støðan er í Føroyum, er ein noyddur at brúka stóran part av síni orku til mál, sum skuldu verið banal avgreiðslumál.

Soleiðis riggar eitt rættarsamfelag ikki! Tað ringasta er, at her tykist einki at kunna lata seg gera.

# Samandráttur og niðurstøða

Hetta er í høvuðsheitum gongdin í 2003. Men virksemi felagsins umfatar eisini annað enn hetta. Vit hava eina vælvirkjandi skrivstovu, hagar nógv venda sær at spyrja um allar teir spurningar, sum stinga seg upp millum ár og dag. Fiskimenn vita í hvussu er, hvagar teir skulu venda sær.

Vit hava nógv kunningarvirksemi. Hetta er fyrst og fremst gjøgnum FF-blaðið, sum kemur út aðru hvørja viku. Tað er einki felag í Føroyum, sum við blaði kemur so ofta í samband við limirnar. Sjálvt í danska ríkinum er neyvan nakað blað hjá fakfelag, sum kemur oftari út enn okkara.

Fjølbroytta innihaldið í FF-blaðnum ger eisini tað, at tað kemur út til eina breiðari fjøld av fólki enn júst til fiskimenn. Vit kunnu eisini fegnast um, at blaðið er sera væl umtókt millum lesararnar. Vit kenna fleiri, sum als ikki halda nakað annað blað.

Vit royna eisini við teldutøknini at fáa »boðskapin« umborð á skipini. Hetta verður fyrst og fremst gjørt gjøgnum heimasíðuna www.fiskimannafelag.fo/skip. Nú ber eisini til at fáa blaðið sent beinleiðis við telduposti. Tey, sum ikki longu fáa tað, eiga at siga okkum frá um teldupostadressuna.

Vit eru við í øðrum virksemi. T.d. eru vit umboðað í nevnd, sum arbeiðir við kokkaútbúgving og í nevnd, sum arbeiðir við útbúgving í fiskireiðskapi. Eisini eru vit umboðað í nevndini fyri Tórshavnar Sjómansheim.

Gera vit annars ein samdrátt av virksemi felagsins, bæði nú og yvirhøvur, kann tað gerast soleiðis:

### Sáttmálin

Vit skulu fyrst og fremst syrgja fyri, at sáttmálar eru fyri allar veiðihættir, og skulu hesir tryggja fiskimonnum rímiligar inntøkur og arbeiðsumstøður.

Her verður ongantíð komið á mál, og tað eydnast eisini við hvørji samráðing at fáa bøtt um sáttmálan á einum ella øðrum øki. Seinast við skipanini við eftirlønaruppsparing, sum tó bert er eitt fyrsta stig at fáa eina rímiliga skipan á hesum øki.

### Hægst møguligir prísir

Fyri fiskimenn er tað av størsta týdningi, hvørjir prísir ið fáast fyri fiskin. Seinast í 80-unum vóru vit millum tey, sum gingu á odda at fáa marknaðarbúskap í fiskiídnaðinum á landi, so fiskimenn skuldu fáa »rættan« prís fyri fiskin.

Hetta er eitt arbeiði, har ongantíð verður komið á mál. Vit hava hildið áfram sum partaeigarar í Fiskamarknaðinum. Og nú verður arbeitt við eini umskipan á økinum, sum skal styrkja kappingina um fiskin enn meira.

### »Rættur« fiskiskapur

Eitt øki, har vit, saman við hinum feløgunum á økinum, hava gjørt nógv burturúr, er at tryggja eina so »rætta« ráðgeving um fiskiskapin undir Føroyum sum gjørligt.

Her hevur verið møguligt at vísa á, at tað ruggar als ikki rætt við »almennu« rágevingini á hesum øki. Í hesum sambandi



| Ár | 92 | 93 | 94 | 95 | 96 | 97 | 98 | 99 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Alder | | | | | | | | | | |
| 2 | 0.021 | 0.013 | 0.025 | 0.070 | 0.339 | 0.040 | 0.079 | 0.121 | 0.126 | 0.098 |
| 3 | 0.100 | 0.102 | 0.120 | 0.161 | 0.191 | 0.166 | 0.216 | 0.272 | 0.419 | 0.333 |
| 4 | 0.327 | 0.187 | 0.191 | 0.461 | 0.450 | 0.407 | 0.313 | 0.420 | 0.350 | 0.670 |
| 5 | 0.331 | 0.255 | 0.251 | 0.280 | 0.797 | 0.826 | 0.634 | 0.426 | 0.407 | 0.264 |
| 6 | 0.495 | 0.190 | 0.223 | 0.363 | 0.906 | 1.005 | 1.030 | 0.712 | 0.489 | 0.709 |
| 7 | 0.455 | 0.296 | 0.147 | 0.339 | 1.158 | 1.401 | 0.718 | 1.161 | 0.602 | 1.571 |
| 8 | 0.335 | 0.194 | 0.187 | 0.214 | 0.954 | 1.432 | 1.168 | 0.743 | 0.976 | 0.743 |
| 9 | 0.392 | 0.225 | 0.201 | 0.334 | 0.862 | 1.127 | 1.024 | 0.574 | 0.181 | 1.118 |
| **Avg 3-7** | **0.342** | **0.206** | **0.185** | **0.321** | **0.700** | **0.761** | **0.582** | **0.598** | **0.451** | **0.709** |

Rættað av ICES til 0,45

*Hetta er almenna talvan hjá ICES, sum vísir veiðitrýstið, sum teir skilja tað. Tann ósvaraði spurningurin er: Hvussu kunnu almennu fiskifrøðingarnir siga, at veiðitrýstið er økt síðan fiskidagaskipanin kom í gildi, tá tað í 2001 var 36% lægri enn í 1996? Einki svar er eisini eitt svar!!*



hevur tað verið sera gott, at føroysku feløgini á økinum hava kunnað fingið hjálp frá íslendska fiskifrøðinginum, Jón Kristjanssyni, sum hevur hjálpt okkum at vísa á nógv ivamál í almennu ráðgevingini um fiskiskap og stovnar.

Tað mest ítøkiliga verður skjalprógvað í hesi ársfrágreiðing. Síðan fiskidagaskipanin kom í gildi, hava vit fingið at vita frá ICES og Fiskirannsóknarstovuni, at veiðitrýstið er hækkað, síðan skipanin kom í gildi í 1996. Tískil var neyðugt at skerja fiskidagatalið munandi.

Men nú kunnu vit, takkað veri Jóni, vísa á, at sambært egnum upplýsingum hjá Fiskirannsóknarstovuni og sambært egnu definitón hjá henni av veiðitrýstinum, er veiðitrýstið eftir t.d. toski lækkað munandi fram til 2001. Her er ein fullkomiliga greið andsøgn millum tað, sum Fiskirannsóknarstovan nýtir sum grundgeving og tey beinleiðis tølini. Vit hava fleiri ferðir í FF-blaðnum eftirlýst eini frágreiðing. Men hon er hvørki komin ella kemur. Men einki svar er eisini eitt svar, og sigur hetta nóg mikið um trúvirðið á Fiskirannsóknastovuni. Men hetta hava fiskimenn og fólk í vinnuni eisini funnið útav.



*Sitandi formaður, Óli Jacobsen, er valdur at sita trý ár afturat, fram til 31. januar 2007. "Eg eri er takksamur um endurnýggjaða álitið og fari at gera alt tað, eg kann, fyri at liva upp til tað" sigur formaðurin.*



### Skipað rættarloysi

Vit kunnu enn einaferð nýta ein stóran part av ársfrágreiðingini at útgreina tað skipaða rættarloysið í samfelagnum, og hvussu hetta rakar fiskimenn. Tað fer fram ein miðvís undirgraving av rættarstøðuni hjá borgaranum, sum ein ikki hevði trúð møguliga. Øll verulig og uppfunnin ivamál verða umsitin og tulkað til skaða fyri borgaran. Hetta verður lutvíst gjørt við, at mál viðvíkjandi borgarum als ikki fáa nakra málsviðgerð, um tað passar í krammið hjá umstingini at lata vera. Hetta er beinleiðis brot á fyrisitingarlógina. Lutvíst verður hetta gjørt við eini »serføroyskari løgfrøði«, har tað altíð ber til hjá myndugleikum at bíleggja »løgfrøðiligar« niðurstøður, sum samsvara við teirra ynski um, hvussu ein lóg skal skiljast. Hetta er altíð til skaða fyri borgaran.

Hjá tí, sum skal eitast at vera andstøða, hevur eingin hjálp verið at heinta. Men vit mugu tó vóna, at eitt komandi landsstýri vil seta »lóg og landaskil« ovarlaga á dagsskránna, so vit aftur kunnu roknast sum eitt rættarsamfelag.

### Trivnaðarmál

Vit hava roynt at seta trivnaðin umborð á dagsskránna. Her kann tað so bert ganga tann eina vegin. Spurningurin er, hvussu vit kunnu fáa ferðina upp. Tað nyttar ikki nógv at forvinna nógvan pening og so enda við at vera útslitin áðrenn tíðina. Her hevur ov lítið verið gjørt, og vit vilja fegin fáa hugskot um, hvussu vit kunnu gera meira á økinum.

### Trý ár afturat

Sum kunnugt er felagsformansval í Fiskimannafelagnum í ár.

Tá freistin var úti tann 4. desember kl. 16, var bert eitt valevni, og var tað sitandi formaður. Hetta merkir, at eg harvið eri valdur at sita trý ár afturat, fram til 31. januar 2007.

Eg eri er takksamur um endurnýggjaða álitið og fari at gera alt tað, eg kann, fyri at liva upp til tað.

Tað er eingin ivi um, at tað standa nógvar avbjóðingar fyri framman hjá fiskimonnum, men við samanhaldi skulu vit nokk klára at verja borg. Men til tess krevst eisini støðugt samband við fiskimenn og álitismenn felagsins.

Eg fari at takka fyri samstarv og samskifti í farna ári og farnum árum. Og við bestu ynskjum fyri 2004.

Í komandi blaði verður meira tilfar frá landsfundinum.



# KUNNGERÐ

## Til løgtingsvalið tann 20. januar 2004 eru hesir listar innkomnir til valnevndina í Eysturoyar valdømi og góðkendir av henni.

### Listi A - Hin Føroyski Fólkaflokkurin

**Undirritaðu játta við hesum at verða valevni hjá Hinum føroyska Fólkaflokkinum - Radikalt Sjálvstýri, (Listi A) í Eysturoy til løgtingsvalið tann 20. Januar 2004.**

Valevni:

| | | |
|---|---|---|
| Regin Ellingsgaard | KT-leiðari | Svínáir |
| Tummas í Garði | yvirlækni | Tórshavn |
| Herborg Hansen | heimarøkt. | Glyvrar |
| Hanna Jensen | lærari | Norðragøta |
| Kjartan Joensen | reiðar | Leirvík |
| Jógvan á Lakjuni | løgtingsmaður | Fuglafjørður |
| Ragnar S. Olsen | varastjóri | Søldarfjørður |
| Haldur Vang | byggimeistari | Toftir |

Stillarar:

| | | |
|---|---|---|
| Sámal Petur Petersen | fiskimaður | Funningur |
| Poul Johs. Johannesen | lærari | Gjógv |
| Olaf Olsen | stjóri | Glyvrar |
| Johan Djurhuus | skipari | Selatrað |
| Erik Lervig | fíggjarleiðari | Leirvík |
| Sigurd Simonsen | borgarstjóri | Fuglafjørður |
| Ámundur Bertelsen | fyrrv. skúlastjóri | Strendur |
| Poul Rustin | restauratør | Fuglafjørður |
| Magnus Heinason | elektrikari | Norðragøtu |
| Tummas M. Djurhuus | elektrikari | Skáli |
| Salomon Gregersen | alari | Syðrugøtu |
| Edna Højgaard | bankakvinna | Saltnes |
| Knút Vesturdal | arbeiðsformaður | Eiði |
| Louis Houmann | útróðrarmaður | Oyndarfjørður |
| Rúni Berg | stjóri | Runavík |

### Listi B - Sambandsflokkurin

**Undirritaðu bjóða seg hervið fram sum valevni til løgtingsvalið 20. Januar 2004 fyri Sambandsflokkin í Eysturoyar valdømi:**

Valevni:

| | | |
|---|---|---|
| Helgi Abrahamsen | floksskrivari | Strendur |
| Edva Jacobsen | bankakvinna | Fuglafjørður |
| Edmund Joensen | løgtingsformaður | Oyrarbakki |
| Marja Lamhauge | verkfrøðingur | Lambareiði |
| Reimund Langgaard | læraraskúlanæm. | Leirvík |
| Alfred Olsen | løgtingsmaður | Saltnes |
| Frithleif Olsen | stjóri | Rituvík |
| Haldóra Ranghamar | bankakvinna | Norðragøtu |

Stillarar:

| | | |
|---|---|---|
| Jóannes Djurhuus | granskari | Søldarfjørður |
| Gunnar Samuelsen | skipari | Fuglafjørður |
| Árni Lervig | servicemaður | Leirvík |
| Dánjal P. Dalbø | arbeiðsformaður | Syðrugøtu |
| Suni Johannesen | skipsførari | Kolbanargjógv |
| Arnold Poulsen | sjómaður | Strendur |
| Dánjal Martin Hansen | bygningssnikkari | Elduvík |
| Eivind Petersen | keypmaður | Oyndarfjørður |
| Petur Jacob Johannesen | maskinmeistari | Skála |
| Eilif Debes | arbeiðsmaður | Oyri |
| Hans Egil Joensen | bilførari | Eiði |
| Kári M. Johannesen | lastbilførari | Runavík |
| Johan S. Johannesen | arbeiðsmaður | Toftir |
| Aloma Davidsen | sparikassakvinna | Toftir |
| Atli Hansen | stjóri | Gøta |

### Listi C - Føroya Javnaðarflokkur

**Vit undirritaðu bjóða okkum fram sum valevni fyri Føroya Javnaðarflokk í Eysturoyar valdømi til løgtingsvalið 20. Januar 2004.**

Valevni:

| | | |
|---|---|---|
| William Max Hansen | skipsførari | Eiði |
| Sunleiv Højgaard | fakfelagsleiðari | Runavík |
| Sylverius Jacobsen | maskinsmiður | Skála |
| Edvin Joensen | lærari | Leirvík |
| Jancy Olsen | skrivstovukvinna | Toftir |
| Andreas Petersen | løgtingsmaður | Syðrugøta |
| Dan Reinert Petersen | sjómaður | Fuglafjørður |
| Rúni Poulsen | leiðari | Strendur |

Stillarar:

| | | |
|---|---|---|
| Símun Abrahamsen | kavari | Fuglafjørður |
| Jørgin Bech | elektrikari | Skála |
| Marjun Biskopstøð | tannlækni | Syðrugøtu |
| Helena Eliassen | skrivstovukvinn | Toftir |
| Anna D. Hansen | flakakvinna | Saltangará |
| Áslakkur Hansen | arbeiðsformaður | Norðragøtu |
| Petur Jákup Heinesen | sjómaður | Leivík |
| Henry Jarnskorð | bussførari | Strendur |
| Jákup A. Joensen | skipari | Eiði |
| Jákup Martin Joensen | bussførari | Oyndarfjørður |
| Sofus Debes Johannesen | bygdarráðsform. | Gjógv |
| Johannus Lamhauge | bilførari | Runavík |
| Eyðun Lauritsen | politistur | Skipanes |
| Michael Pattinson | bóndi | Funningsfjørður |
| Jógvan Finnur Poulsen | lærari | Fuglafjørður |

### Listi D - Sjálvstýrisflokkurin

**Vit undirritaðu loyva okkum hervið at stilla niðanfyrinevndu valevni upp til løtingsvalið tann 20. januar 2004 hjá Sjálvstýrisflokkinum í Eysuroyar valdømi, og hava tey á hjáløgdu váttanum váttað uppstilling, og eru tey í bókstavarøð:**

Valevni:

| | | |
|---|---|---|
| Malan Mohr Dahl | lærari | Fuglafjørður |
| Jón Ellendersen | nerv. Námsfrøð. | Oyrarbakki |
| Dánjal P. (Piddi) Hansen | fulltrúi | Toftir |
| Kári P. Højgaard | løgtingsmaður | Saltangará |
| Hjalmar Juul | handverkari | Funningur |
| Lassi Klein | fíggjarleiðari | Saltangará |
| Pauli Poulsen | góðskuleiðari | Innan Glyvur |
| Kenneth Rasmussen | maskinmeistari | Saltangará |

Stillarar:

| | | |
|---|---|---|
| Arnhold Olsen | arbeiðsform. | Rituvík |
| Harry Benjaminsen | arbeiðsmaður | Toftir |
| Tórhallur Thomsen | stjóri | Norðragøta |
| Selinda í Heiðunum | tryggingarráðgevi | Saltangará |
| Andres Lervig | sjúkrasystir | Fuglafjørður |
| Ásbjørn Jacobsen | skrivari | Leirvík |
| Johan Kass | skipari | Strendur |
| Karl Rasmussen | sølumaður | Skála |
| Jóhan Petur Petersen | stjóri | Norðskála |
| Sonni Kalsoy | sjómaður | Eiði |
| Sámal Petur Hansen | bátasmiður | Runavík |
| Hans J. Lamhauge | lærari | Lamba |
| Róland Jakobsen | stjóri | Glyvrar |
| Ingvard Olsen | telefonmontør | Glyvrar |
| Lenni Højgaard | telefonm. | Søldarfjørður |

### Listi E - Tjóðveldisflokkurin

**Undirritaðu bjóða seg fram sum valevni fyri Tjóðveldisflokkin í Eysturoyar valdømi til løgtingsvalið tann 20. januar 2004.**

Valevni:

| | | |
|---|---|---|
| Torbjørn Jacobsen | skipari | Glyvrar |
| Olaf í Garði Joensen | maskinmeistari | Eiði |
| Hans Tausen Olsen | maskinmaður | Runavík |
| Anfinn Olsen | maskinmaður | Søldarfjørður |
| Jón Tyril | arbeiðsmaður | Gøta |
| Vilmund Jacobsen | blaðmaður | Toftir |
| Jóannes Eliasen | evnafrøðingur | Leivík |
| Andrea Eldevig | lærarávikarur | Fuglafjørður |

Stillarar:

| | | |
|---|---|---|
| Andreas S. Højgaard | stýrimaður | Rituvík |
| Lyon Johannesen | postboð | Runavík |
| Hildigarð Høghamar | húsmóðir | Eiði |
| Suni Ellingsgaard Poulsen | sjómaður | Eiði |
| Árant J. Hansen | lærari | Norðragøta |
| Rasmus Skorðheim | bóndi | Selatrað |
| Petur Sofus Olsen | maskinmeistari | Skála |
| Eli Johannesen | sjómaður | Oyri |
| Asaf Olsen | pensionistur | Søldarfjørður |
| Harry Jacobsen | stýrimaður | Toftir |
| Mattheus Fossdalsá | sjómaður | Nesi |
| Margit Poulsen | kontórassistent | Syrðugøta |
| Karlamagnus Olsen | stálskipasmiður | Leirvík |
| Fritleif Joensen | bóndi | Fuglafjørður |
| Unn Eldevig Petrsen | stuðul | Fuglafjørður |

### Listi H - Miðflokkurin

**Miðflokkurin stillar hesi valevni upp í Eysturoyar valdømi til løgtingsvalið tann 20. januar 2004**

Valevni:

| | | |
|---|---|---|
| Sæunn Ólavsdóttir Hansen | leiðsluskrivari | Saltangará |
| Jan Højgaard | lesandi | Toftir |
| Arni Abrahamsen | lesandi | Glyvrar |
| Vinjard Johansen | handilsleiðari | Eiði |
| Kristian Martin Petersen | grannskoðari | Fuglafjørður |
| Bill Justinussen | landsstýrismaður | Glyvrar |
| Jákup Jacobsen | arbeiðsmaður | Lorvík |

Stillarar:

| | | |
|---|---|---|
| Eyðun Jacobsen | programleiðari | Glyvrar |
| J. Regin Jacobsen | stjóri | Saltangará |
| Sigfred Johannesen | arbeiðsmaður | Nes |
| Sofus S. Gregersen | marknaðarleiðari | Fuglafjørður |
| Tordur J. Niclassen | fyristøðumaður | Eiði |
| Niels Martin Olsen | elektrikari | Strendur |
| Tummas J. Høj | bussførari | Strendur |
| Jan Heinesen | maskinmeistari | Syðrugøta |
| Bjarta Petersen | lesandi | Syðrugøta |
| Ása Sevdal | bussførari | Runavík |
| Dagbjørt Ólavsdóttir Hansen | | Norðragøta |
| Hansina Dam Jacobsen | heilsuatstøðingur | Norðragøta |
| Morid Johannesen | sjúkrasystir | Lambi |
| Tummas Anthoniussen | fiskimaður | Oyrarbakki |
| Jens Magnus Jensen | arbeiðsformaður | Leirvík |

### Listi K - Hin stuttligi Flokkurin

**Undirritaði bjóðar seg fram sum valevni fyri Hin stuttliga Flokkin í Eysturoyar valdømi til løgtingsvalið tann 20. januar 2004.**

Valevni:

| | | |
|---|---|---|
| Rubek (Steinbjarnarson) Lilaa | lesandi | Tórshavn |

Stillarar:

| | | |
|---|---|---|
| Áki Troest Hansen | lesandi | Saltangará |
| Jørgin A. S. Joensen | trukkførari | Norðskála |
| Eivild Vang | arbeiðskvinna | Funningsfjørður |
| Hallur Hansen | timburmaður | Saltangará |
| Gestur á Líknagøtu | sjómaður | Saltangará |
| Margreth á Líknagøtu | málsviðgeri | Saltangará |
| Fróði Davidsen | maskinmaður | Saltangará |
| Jenni Davidsen | lærari | Saltangará |
| Kári Troest | elektrikari | Saltangará |
| Inger Olsen | læraralesandi | Saltangará |
| Petur Lamhauge | lærari | Lambi |

Fuglafjørður, tann 6. januar 2004

Løgtingsvalnevndin fyri Eysturoyar valdømi
Arnold Abrahamsen, formaður

# KUNNGERÐ

Løgtingsvalnevndin fyri Suðurstreymoyar valdømi hevur móttikið hesar valevnislistar til løgtingsvalið týsdagin 20. januar 2004.

## Listi A

**Listi A Hin Føroyski Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri)**

1. **Óli Breckmann,** løgtingsmaður, Argir
2. **Eli Christiansen,** umsitingarleiðari, Tórshavn
3. **Bjarni Djurholm,** landsstýrismaður, Hoyvík
4. **Turid Christophersen,** hjálparfólk, Tórshavn
5. **Elna Skylv Hansen,** ítróttaráðgevi, Kaldbak
6. **Jan Hansen,** bygdaráðslimur, Nólsoy
7. **Poul Michelsen,** løgtingsmaður, Tórshavn
8. **Annika Olsen,** handilsskúlalærari, Tórshavn
9. **Heðin D. Poulsen,** løgfrøðingur, Tórshavn
10. **Torkil V. Rasmussen,** læraravikarur, Tórshavn

**Stillarar**

**Regin W. Dalsgaard,** edv-maður, Smærugøta 27, 100 Tórshavn
**Jan Christiansen,** borgarstjóri, Marinargøta 26, 188 Hoyvík
**Steingrím Niclassen,** fyrrv. skúlastjóri, Frúutrøð 18, 100 Tórshavn
**Anna Húsgarð,** sjúkrahjálpari, Brattabrekka 8, 100 Tórshavn
**Jógvan Sundstein,** fyrrv. løgmaður, Skákið 9, 100 Tórshavn
**Líggjas Joensen,** stjóri, undir Heygnum 7, 100 Tórshavn
**Katrin Dahl,** fyrrv. hvíldarheimsleiðari, N. Mohrsg. 15, 188 Hoyvík
**Magnus H. Magnussen,** aut. el-innleggjari, Gripsv. 18, 100 Tórsh.
**Maria á Dul,** starvsfólkastjóri, Traðartún 24, 160 Argir
**Hans A. M. Johansen,** goymslumaður, Argjavegur 61, 160 Argir
**Jórun Petersen,** húsmóðir, á Gørðum, 180 Kaldbak
**Cornelius Reinert,** bóndi, við Á, 180 Kaldbak
**Dánjal Pauli Danielsen,** fyrrv. landsstýrismaður, 176 Velbastaður
**Demmus Hentze,** landsrættarsakførari, Handan Á 7, 100 Tórshavn
**Rene Hansen,** sølumaður, 270 Nólsoy

## Listi C

**Føroya Javnaðarflokkur**

1. **Bergur P. Dam,** skrivstovumaður, Tórshavn
2. **Sophus E. Dal Christiansen,** søluráðgevi, Tórshavn
3. **Katrin Dahl Jakobsen,** løgtingskvinna, Tórshavn
4. **John Johannessen,** tíðindamaður, Tórshavn
5. **Elin Lindenskov,** býráðslimur, Tórshavn
6. **Kristian Magnussen,** løgtingsmaður, Tórshavn
7. **Bjarki Mohr,** starvsfólkaleiðari, Tórshavn
8. **Kári Mortensen,** studentaskúlalærari, Tórshavn
9. **Helena Dam á Neystabø,** leiðari, Tórshavn
10. **Jan Poulsen,** løgreglumaður, Tórshavn
11. **Joan Ziskason,** sjúkrasystir, Hoyvík

**Stillarar**

**Anna Maria Persson,** sjúkrasystir, Bíggjarvegur 3, 100 Tórshavn
**Atli P. Dam,** varastjóri, Traðabrekka 17, 100 Tórshavn
**Edith Dahl,** húsmóðir, Villingardalsvegur 49, 100 Tórshavn
**Havgrímur Johannessen,** stjóri, J. Broncksgøta 48, 100 Tórshavn
**Hervør Hansen,** krambakvinna, 270 Nólsoy
**Jacob Lindenskov,** fyrrv. landsstýrismaður, Torfinsgøta 31, 100 Tórshavn
**Jákup Danielsen,** leiðari. Velbastaðvegur 50, 100 Tórshavn
**Jóhan Samuelsen,** lærari, Torfinsgøta 38, 100 Tórshavn
**Jói Winter,** sjómaður, Traðagøta 2A, 160 Argir
**Jona Henriksen,** fyrrv. KFUK skrivari, Reyngøta 20, 100 Tórshavn
**Jørmund E. Zachariasen,** arbeiðari, 280 Hestur
**Petur Jensen,** vátrúmfrøðingur, Berjabrekka 51, 100 Tórshavn
**Rúni Øregaard,** lærari, Hamarsgøta 38, 100 Tórshavn
**Torfinn Smith,** býráðslimur, Turiðargøta 8, 100 Tórshavn
**Torkil Ejdesgaard,** vikarur, oman Stóragarð 6, 100 Tórshavn

## Listi E

**Tjóðveldisflokkurin**

1. **Jógvan Arge,** býráðslimur, Tórshavn
2. **Niels Uni Dam,** samskiftisfólk, Tórshavn
3. **Rói Egholm,** stjóri, Argir
4. **Annita á Fríðriksmørk,** løgtingskvinna, Hoyvík
5. **Kristina Háfoss,** løgtingskvinna, Hoyvík
6. **Finnur Helmsdal,** sosialráðgevi, Hoyvík
7. **Høgni Hoydal,** løgtingsmaður, Hoyvík
8. **Tórfríð Johannesen,** assistentur, Nólsoy
9. **Rúni Nielsen,** sølumaður, Tórshavn
10. **Bjørn Patursson,** bóndi, Koltur
11. **Per Simonsen,** skipari, Tórshavn

**Stillarar**

**Edith í Jákupsstovu,** húsmóðir, Tórsbyrgi 17, 100 Tórshavn
**Bjørg Hanusson,** pedagogur, Berjabrekka 103, 100 Tórshavn
**Hanna við Høgadalsá,** húsmóðir, Sundsvegur 9, 100 Tórshavn
**Egil Simonsen,** skipari, Garðavegur 7, 188 Hoyvík
**Andreas Joensen,** arbeiðsmaður, 187 Hvítanes
**Jákup Pauli Gregoriussen,** arkitektur, í Vika, 100 Tórshavn
**Jens K. Jacobsen,** vrakari, Geilatún 16, 100 Tórshavn
**Svenning Tausen,** lærari, Noregsvegur 5, 100 Tórshavn
**Karin Kjølbro,** leiðari, Høvdagøta 7, 160 Argir
**Ingrið Sondum,** lærari, 176 Velbastaður
**Jóannes Patursson,** bóndi, 175 Kirkjubøur
**Torbjørn Jacobsen,** arbeiðsmaður, 180 Kaldbak
**Ingi Mohr,** leiðari, Sundsvegur 7, 100 Tórshavn
**Petur Simonsen,** stjóri, Dalakrókur 14, 100 Tórshavn
**Vígdis Bjarnadóttir,** bókavørður, 270 Nólsoy

## Listi B

**Sambandsflokkurin**

1. **Annfinn Brekkstein,** borgarstjóri, Velbastaður
2. **Súsanna Dam,** bankakvinna, Tórshavn
3. **Janus Djurhuus,** arbeiðsformaður, Tórshavn
4. **Jakob Holm,** yvirstýrimaður, Argir
5. **Michael Jensen,** inspektørur, Tórshavn
6. **Jóhan Petur Johannesen,** lærari, Argir
7. **Kaj Leo Johannesen,** løgtingsmaður, Tórshavn
8. **Høgni Mikkelsen,** byggimeistari, Tórshavn
9. **Heðin Mortensen,** løgtingsmaður, Tórshavn
10. **Lisbeth Lindenskov Petersen,** løgtingskvinna, Tórshavn
11. **Bjarti Thomsen,** sivilverkfrøðingur, Nólsoy

**Stillarar**

**Poul á Kletti,** blaðmaður, Varðabyrgi 10, 100 Tórshavn
**Andrew Jensen,** arbeiðsformaður, J. C. Svabosgøta 26, 100 Tórshavn
**Alfred Hofgaard,** snikkari, Rasmusargøta 3, 100 Tórshavn
**Anna á Steig,** skrivari, N. Mohrsgøta 13, 188 Hoyvík
**Olaf Andreasen,** arbeiðsmaður, Yviri við Strond 57, 100 Tórshavn
**Henry Debes Joensen,** fyrrv. varaskúlastjóri, Kráargøta 5, 160 Argir
**Trúgvi Fossdal Guttesen,** verkfrøðingur, Fjalsgøta 10, 100 Tórshavn
**Beate L. Samuelsen,** blaðstjóri, Varðalág 4, 100 Tórshavn
**Johannes Martin Olsen,** pensionistur, Velbastaðvegur 31, 100 Tórshavn
**Hansina Brekkstein,** skrivstovukvinna, 176 Velbastaður
**Petur Weihe,** umsjónarmaður, Lynggøta 13, 100 Tórshavn
**Herborg Joensen,** oldfrúa, Mýrusnípuvegur 25, 100 Tórshavn
**Anfinn Reinert,** 2. varasløkkiliðsstjóri, Dalagøta 23, 100 Tórshavn
**Eilif Samuelsen,** lærari, Kráarvegur 11, 100 Tórshavn
**Bent J. H. Hansen,** varðhaldsleiðari, Kráargøta 14, 160 Argir

## Listi D

**Sjálvstýrisflokkurin**

1. **Carl August Arge,** rúsevnisráðgevi, Tórshavn
2. **Eilif Brimheim,** vinnukavari, Tórshavn
3. **John Eysturoy,** skrivstovumaður, Tórshavn
4. **Sámal Petur í Grund,** skipari, Søldarfjørður
5. **Hans J. Hermansen,** koyrilærari, Tórshavn
6. **Inga F. Hjalnafoss,** handilskvinna, Hoyvík
7. **Malan Johansen,** búskaparfrøðingur, Tórshavn
8. **Ása Olsen,** fakfelagsleiðari, Tórshavn
9. **Klæmint Olsen,** handilsskúlalærari, Tórshavn
10. **Terji T. Rasmussen,** námsfrøðingur, Nólsoy
11. **Johan M. Stenberg,** lærari, Argir

**Stillarar**

**Marjun Hansen,** húsmóðir, Tildugøta 9, 100 Tórshavn
**Heine Olsen,** pensionistur, Kovalág 10, 100 Tórshavn
**Hilmar Kass,** fyrrv. sjómansskúlalærari, Eystari Ringvegur 9, 100 Tórshavn
**Ingibjørg Nicolajsen,** pensionistur, Tinghúsvegur 73, 100 Tórshavn
**Svenn Brimheim,** ráðgev. verkfrøðingur, Rektaragøta 12, 100 Tórshavn
**Petur Splidt,** stjóri, 176 Velbastaður
**Sonni Óli Djurhuus,** lærari, Eirargarður 8, íbúð 323, 100 Tórshavn
**Hildur Johannesen,** heilsuhjálpari, Sigmundargøta 22, 100 Tórshavn
**Rógvi Hansen,** stjóri, Tildugøta 9, 100 Tórshavn
**Tórbjørn Poulsen,** verkfrøðingur, Bóndabrekka 21, 100 Tórshavn
**Poul Arne Joensen,** skrivstovumaður, Grønlandsvegur 51, 100 Tórshavn
**Poul Næs Sørensen,** telegrafistur, Grønlandsvegur 28, 100 Tórshavn
**Sjúrður Samuelsen,** skipasýnsmaður, handan Á 4, 100 Tórshavn
**Noomi Sigmundsdóttir Júlíusson,** handilskvinna, Dalag. 22, 100 Tórsh.
**Eyðbjørg Kass,** skrivstovukvinna, Álvastígur 5, 100 Tórshavn

## Listi H

**Miðflokkurin**

1. **Absalon Absalonsen,** skipari, Tórshavn
2. **Thomas Juul Askham,** rørleggjari, Tórshavn
3. **Niels Hammer,** sernámsfrøðingur, Hovi
4. **Egin Henriksen,** programmør, Tórshavn
5. **Álvur Kirke,** goymslumaður, Kaldbak
6. **Charlotta á Váli Olsen,** stovnsleiðari, Tórshavn
7. **Jónfinn Olsen,** sjálvstøðugur vinnurekandi, Miðvágur
8. **Jónfinn Petersen,** sølumaður, Argir
9. **Jenis av Rana,** lækni, Tórshavn
10. **Elin Tausen,** handilskvinna, Argir

**Stillarar**

**Lissi Hansen,** lærari, millum Horna 4, 100 Tórshavn
**Steindor Hjaltalin,** servisumaður, Vípuvegur 9, 100 Tórshavn
**Victor Carlsen,** sølumaður, Dánjalstrøð 15, 100 Tórshavn
**Heine Lützen,** tryggingarmaður, Kristiansgøta 23, 188 Hoyvík
**Annika N. við Skipá,** lærari, Hákunargøta 5, 188 Hoyvík
**Johannus Poulsen,** arbeiðstakari, Ovaragøta 36, 188 Hoyvík
**Tórun Bech,** dagrøktari, oman Hoydalar 33, 188 Hoyvík
**Egon Rasmussen,** bilmekanikari, Torkilsgøta 11, 188 Hoyvík
**Beinta K. Áargarð,** Millum Gilja 177, 188 Hoyvík
**Conny Danielsen,** handilskvinna, Leitisgøta 10, 160 Argir
**Dánjal á Dul Jacobsen,** umsitingarleiðari, Heygskrókur 13A, 100 Tórshavn
**Símin Hansen,** el-innleggjari, Flatnagerði 10A, 100 Tórshavn
**Harald M. Haraldsen,** sjúkrarøktari, Lýðarsvegur 11, 188 Hoyvík
**Hjalti á Lava,** kt-ráðgevi, í Lágni 13, 100 Tórshavn
**Svenning av Lofti,** evangelistur, Sólteigur 4, 100 Tórshavn

## Listi K

**Hin stuttligi flokkurin**

1. **Johan Dalsgaard,** lesandi, Kollafjørður

**Stillarar**

**Malan Ellingsgaard,** heimagangandi, Íslandsvegur 39, 100 Tórshavn
**Astvard Hansen,** maskinførari, Íslandsvegur 39, 100 Tórshavn
**Magnus Wilhelm Dam Jacobsen,** urtagarðsm., Tungugøta 3, 100 Tórshavn
**Niels Heðin Gaard Joensen,** kokkur, Pætursgøta 3, 100 Tórshavn
**Brynhild Gård Joensen,** blómubindari, Argjavegur 41A, 160 Argir
**Harald Gaard Joensen,** maskinmaður, Javnagøta 7, 100 Tórshavn
**Anna Eikhólm Joensen,** lesandi, Javnagøta 7, 100 Tórshavn
**Guðny Eikhólm,** pedagogur, Javnagøta 7, 100 Tórshavn
**Eyðbjørg Djurhuus,** heimagangandi, 187 Hvítanes
**Ólavur Gaard Joensen,** dekkari, Niðaragøta 2 íbúð 5, 188 Hoyvík
**Anna Dalsgaard,** pedagogur, Argjavegur 41, 160 Argir
**Poul á Kák Poulsen,** kokkur, Djóna í Geilsgøta 63, 100 Tórshavn
**Reinholdina Poulsen,** klinikkdama, Djóna í Geilsgøta 63, 100 Tórshavn
**Ormar Dalsgaard,** rørsmiður, í Lon 13, 100 Tórshavn

Tórshavn 8. januar 2004

LØGTINGSVALNEVNDIN FYRI SUÐURSTREYMOYAR VALDØMI

*Janus Isfeldt* formaður – *Birna Dahl* – *Jutta Midjord*

# Bátasøgan á Eiði

## 3. partur av frásøgn eftir Símin Jóhann Wolles

**Vit prenta í dag 3. partin av bátasøguni á Eiði hjá Símun Johan Wolles. Hetta er eisini ein almenn søguskriving um útróður og tey livikor, sum vóru í Føroyum umleið næstseinasta aldaskifti.**

### "Pálsstovubáturin"

"Pálsstovubáturin" er nr 9, og grindabátur nr 3. Hann hevur staðið í Pálsstovuneystinum. Teir, ið mannaðu bátin, vóru úr Pálsstovu, úr Miklagarði, úr Jákupsstovu. Fredrik Ferdnand var formaður, og Hanus, sonur hansara, var við. Aggesteinis róði uppá Pálsstovupartin. Hinir vóru Hanus millum Helli, Dávur og Óla Jákup úr Jákupsstovu, og Hans Martin og Pól í Miklagarði, seinni Jóan Magnus, beiggi Jóhannes, eftir at Pól varð givin vegna sjúku. Hann doyði ungur av vætursøtt, segði Jóhannus.

Johannes segði um Jóan Magnus, bróður sín, at hann var so ringur av sjóverki, at hann minnist, at hann spýði inni í roykstovuni, tá ið hann hevði fingið útróðrarboð. Mamman royndi at fáa okkurt niður í hann, áðrenn hann fór. Tað hevur ikki verið lætt hjá mammuni at lata hann fara. Pápin var jú farin á útróðri.



*Í seinasta blaði høvdu vit frásøgn um, tá "Lisa" kollsigldi í 1924. Á hesi myndini eru fleiri, sum vóru við. Í aftara rað er Jákup í Garði, sum druknaði tá báturin kollsigldi. Høgrumegin er kona hansara, Anna Sofía, og dóttirin Betta. Drongurin fremst t.h. er sonurin, Klæmint, og millum foreldrini Hans Jacob. Teir báðir bjargaðust sum við einum undri. Gentan fremst t.v. er Elly, sum giftist við Edvardi hjá Jógvani í Skorini.*

Johannes sigur frá: "Eg var ein minniligan dag við "Pálsstovubátinum", tá eg var um 16 ára gamal. Tað var stormur lágt. Tá ið vit komu aftur, róðu vit suður fyri Grønhøvdan og sigldu fjørðin. Tað var ógviliga stór vindvág tann dagin. Eg minnist ein lítil slupp, "Surprice", lá fyri akker. Hon setti at mastrini av vindvágni og floytaði um hjálp. Men vit, eins og hinir bátarnir, høvdu nóg mikið at bjarga okkum sjálvum. Tá vit skuldu sigla inn á Bugnesgjógv, vóru tveir bátar inni á gjónni. Vit løgdu so uppí, og ongantíð bar til at leggja bátin so mikið tvøran aftur. Tí máttu vit royna at toga okkum suður undir Breiðá. Tað tók meira enn ein tíma. Vit mundu bara ikki komið suður um Royrasker. Vit komu so suður undir Breiðá, vit kastaðu fiskin upp, drógu bátin og gingu norð. Eg var ungur og útlúgvaður. Eg legði meg, tá ið eg hevði fingið mær. Eg veit ikki, um eg var sovnaður. Tá kom boð frá formanninum at koma suður aftur eftir bátinum. Hann var stokkin vesturum, so tað mátti berast skjótt at at fáa bát og fisk norð, áðrenn tað ókyrraði. Hans Martin farbróður hevur sagt frá einaferð, teir sótu vestur undir boða í torra. Tað var so síð alda. Tá vit fóru at rógva eystur í Fjalshæddina til at fara heim, tá fór Mýlingur undir í hvørjum aldudali."

Hesin dagurin er bert ein lýsing av teim mongu strævnu døgunum, teir gomlu stríddu seg ígjøgnum.

### Funnu pott

"Pálsstovubáturin" fann miðið Pottur. Navnið kom av einum, teir róptu Gamli Jógvan í Fjósinum. Hann var við sum tiltaksmaður hendan dagin, teir funnu Pott. Teir skuldu fregna hann um miðið niðri í pakkhúsinum. Teir spurdu hann, um tað var stórur botnur. Hann vildi dylja sum best og helt, tað var kulla niður í. Liðugt var, navnið bleiv Pottur.

Teir royndu at hava tað sum loynimið og fóru til útróðrar á so nógvari lágætt, at teir vendu bátinum, áðrenn hann varð drigin oman. Uppi á landi settust fýra mans til árar og skutu so bátin frá landi við framendanum fyri. Teir tóku hinar inn Úti í Eyga. So hildu teir til havs. Teir hildu um ránna úteftir og hildu fyri sínamillum:"Í dag munnu vit vera einsamallir". Jú, einsamallir vóru teir, tá teir komu út og kastaðu. Tað løgdu bara tveir inn at halda, t.v.s. at fiska við snøri. Seks andøvdu. So róðu teir aftur. Tá skuldi bara ein leggja inn at halda. So var farið til árar, og teir róðu tað, sum eftir var av eystfallinum, alt tað komandi vestfallið og aftur eitt eystfall afturat. So slitu teir at enda upp land eftir at hava róð trý sjóvarføll og komu at landi eysturi á Seiðabergi niðri á Møl á fullari fjøru - tá er vestfalsbroddur.

Har settu teir Aggestein upp til at fara heim at siga frá. Tað varð so kolamyrkt, at teir máttu trilva seg fram við bátinum við at styðja seg við mastrini frammanfyri heim í Taravík. Aggestein kendi seg ikki í myrkrinum, fyrr hann gekk seg í geilina, sum í gomlum døgum gekk heim í bygdina heim á Geilagarð. Aggestein kom omanaftur við lykt og var í góðum lag. Hann skuldi rópa teir og siga: "Vælsignaðir komið at landi. Eg havi eina pottaflósku. Hon er um akslarnar." Aggestein var tiltikin at dáma ein dropa av tí váta slagnum. Hetta var so ein søga um "Pálsstovubátin" og Pott.

Hanus í Garði tók miðið av teimum við at fara so tíðliga og leggja seg í sólina eystan fyri teir og fekk á tann hátt útleikan. So setti hann línu og til bar. Teir komu um Pott.




*Jógvan í Skorini var ein av teimum gomlu útróðrarmonnunum. Men hann var eisini seyðamaður, sum tað verður lýst á hesum postkortinum.*

### Gekk úr Havn til Eiðis

Johannes segði, at um várarnar var einki óvanligt, at tjørnuvíkingar máttu seta upp í Vík, og teir sóu lyktirnar um morgnarnar, tá teir fóru suður til Víkar eftir bátinum. Tjørnuvíkinginar lógu ikki heima, um báturin stóð í Vík. Teir gingu norð og suður aftur eftir bátinum, og so til útróðrar morgunin eftir.

Jóhannus segði eisini, at Aggestein var einasti eiðismaður, sum hevði gingið úr Havn og til Eiðis, tað hann visti um.

Aggestein var úr Porkeri, og tá hann kom norð av fyrstantíð, gekk hann úr Kirkjubø til Eiðis. Við var eisini sonur hansara, Jóhan hjá Aggestein vit róptu. Hann bar tað, teir høvdu í viðføri eisini, og nógv av teininum hevði hann borið Jóhan eisini. Hann kom sum húskallur á Látrið. Hann hevði gingið úr Porkeri til Hvalbiar. So var hann komin við einum skjútsbáti til Skúvoyar. Hagani inn á Sand. So til gongu til Skopunar

*Framhald á næstu síðu*



*Føroyskir bátar á Roskildefjørðinum. Bátin t.v. hevur Símin Johan smíðað. Hin er smíðaður av Hans Christian Joensen. Símun Johan ger vart við, at ein bátasmiður av Trøllanesi var Jákup í Innistovu, sum seinni búsettist á Viðareiði.*



Útróðrarmaður klæddur í roðstúku, roðbrokur og kol, so sum útróðrarmenn vanliga vóru ílatnir til upp ímóti 1890. Serliga leggja vit til merkis, at teir ikki nýttu stivlar, men einans húðaskógvar ella skolingar. Um menn vóru vátir um beinini, løgdu teir einki í. — Í góðum føroyskum hosum og skolingum skuldi tað ikki vera so kalt.

og við bát til Kirkjubøar. Hagani til gongu til Eiðis.

Seinni giftist hann við Suffiu úr Pálsstovu, sum var kúlut. Tey giftist inn í eitt sornhús hjá teimum í Miklagarði, sum stóð vestanfyri Látrastíggin omanvert eystantil húsini hjá Jørgin í Garði. Tey bæði fingu einki barn.

"Har uppi lærdi eg at lesa hja Suffíu", segði Johannus, "ikki var meira húsarúmd enn so, at einaferð kom Aggestein við einum leypi av grunningshøvdum og hálvdi inn á gólvið. Eg minnist, at høvdini fóru um alt gólvið." Eg kann leggja afturat, at Johannus læs sum ein prestur, sum tey plaga at taka til.

Skúlahølini eru ikki alt fyri at duga. Suffia dugdi væl til hendurnar. Johannus svav ofta har uppi í sornhúsinum hjá teimum. Johannes minnist, at hon virkaði honum eini hosubond. Tey fingu so eini hús, sum stóðu áføst við húsini í Fjósinum. Tað var tann gamla Pálsstova, áðrenn Hans Jákup, pápi Hanus, bygdi, har húsini nú standa. Tað var kallað hjá Aggestein, so leingi tey stóðu uppi.

## Til Mykinesar at siga frá

Táið fyrri "Nesbáturin" var burturgingin, fóru teir við "Pálsstovubátinum" vestur til Mykinesar at siga frá. Við "Nesbátinum" var ein mikinesdrongur, sum at Laurus. Hann var komin í húsið hjá Peri í Lamba at vera. Hann var við "Nesbátinum" hendan feigdardagin. Hetta var skírisaftan 1883. Tað var gott veður, men landnyrðingur í ættini. Teir høvdu sett línuna fyri fallandi eystfall, men komu ikki um, sum teir róptu tað. Teir raktu ikki sjálvt miðið og egndu tí uppá aftur til at seta niður aftur til vestfallskyrrindir. Teir eru so inn aftur á veg til komandi eystfall, og har eru teir helst farnir í broddinum. Tað kom eitt ringt æl á komandi eystfalli, sum ofta er á eysturætt, segði Johannus frá Hans Martini. Tað hevði væl av vindi í sær. Eisini "Pálsstovubáturin" hevði tosað við "Nesbátin", tá teir fóru inn. Johannus segði frá Hans Martini, at pápi hansara skuldi siga: "Tað er ikki við mín vilja, vit seta niður aftur.."

Skírisdag 1883 fara teir til Mykinesar við "Pálsstovubátinum" at siga frá. Tað var so nógv brim, at teir kundu ikki koma inn á Gjónna. Mykinesmenn komu oman á Berg, og teir fingu rópt til teirra, hvørji ørindi teirra vóru. So aftur til árar uttan at hava lagt inn. Tað vísti seg at vera ein langur róður.

Jóan Magnus í Miklagarði og Suffia, systur hansara, fóru hendan vanlukkudagin oman at vita, um báturin var komin hendan dagin, tá hann bleiv burtur. Tey vóru 10 og 12 ár. So mikið skiltu tey á monnum, at tey hildu seg í fjøruni allan dagin. Høvdu ongan hug at fara niðanaftur við ófrættatíðindum. Jóan Magnus mintist, hvussu ringt tey sum børn høvdu tað henda dagin, tá einginn vildi siga teimum stakkals børnum nakað, hóast tey mundu gruna ilt.



*Sannilena á Lofti er verdóttir tann í greinini umrødda Sigmund á Lofti. Sannilena er elsta eiðisfólk, 95 ár, og kann sum fáur greiða frá umstøðum í gomlum døgum.*

## Róður at fáa prest at biðja

Ein onnur ferð við "Pálsstovubátinum" var, tá teir fóru út á Nes at biðja prestin biðja fyri Hans Maliusi millum Hellið - (Fyrr var bygdin Ljósá í tveimum. Norðari býlingurin kallaðist millum Hellið, og sunnari í Gimbrunum). Hans Malius var álvarsliga sjúkur. Hans Martin, farbróður Johannesar, segði, tað varð ein sera stríggin ferð. Tað var illveður á landsynningi, tá teir fóru. Hann vaks vindin, meðan teir róðu suðureftir. Tað var ikki meir enn teir knógvaðu suður um Raktanga og máttu seta upp á Toftum. So til gongu út á Nes. Hans Malius doyði, men teir høvdu gjørt tað, teir kundu.

## "Falkurin"

Bátur nr. 10 var "Falkurin", eyknevndur "Hjallurin". Tað kom av Pól hjá Siggu. Hann var so fýrigur ella skundigur maður. Onkur spurdi Pól: "Hvar fert tú í morgun so skundigur?" Hann skuldi svara: "Vit fara út á Selatræð eftir viði til ein hjall til Hanus úti á Toftini." Men teir fóru at keypa sær við til bát og vildu dylja tað sum longst. Einaferð Pól var farin til útróðrar, og hann hevði sett opið eftir sær, skuldi Pól á Forinum siga: "Um tað var hurð í hurð av Forunum og vestur á Glæmuna, so var ikki ein í klinkuni, tá ið Pól var farin." Glæman er av ytstu miðum vesturi í havi.

"Falkurin" var ein partabátur. Teir, sum áttu bátin og róðu við, vóru Garðsbrøðurnir Pól, Jóan Magnus, Tummas, Jakup Pauli, Hanus og Jógvan á Toftini, Hans Jákup á Trætistykkinum og Pól hja Siggu. Garðsbrøðurnir skuldu vera raskir menn.

Ofta hevur verið sagt ymiskt til skemtanar um gamla Hans Jákup í Garði. Einaferð kom stormur lágt, og bátanir vóru úti. Onkur skuldi spyrja hann um bátarnar. Tá skuldi hann svara, at hann var ikki bangin um sínar dreingir. Allir vunnu tó heim uttan "Hjallurin". Teir lógu á Beingjónni alla náttina og vunnu ikki heim um Torvanes. Teir royndu tríggjar ferðir. Ta seinastu ferð drivu teir so langt vestur frá, at teir hættaðu sær ikki at royna aftur, men togaðu seg inn á Beingjónna, har teir lógu fyri náttina.

Pól í Garði hevur sagt mær frá hesi náttini, sum var bæði long, myrk og vát. Har var gott at vera, inntil tað varð myrkt. Men við tað, at vindurin var so nógvur, var ringt at halda bátin leysan av landi. So loysti hann avfallið út á náttina. Tá var ikki gott at liggja, har vindurin tók annað út í luftina, so hon rakti beint niður í bátin. So tað var nóg mikið at oysa. Nei, tað var ein sera ótýdlig, vát og long nátt, segði Pól.

"Móti morgni stilti hann knappliga av, og vit løgdu til brots at rógva heim. So stóra vindvág havi eg ikki sæð. Hon gekk eftir bakkatromini heim fyri Skarðhamri, tá ið vit róðu heim fyri".

"Hjallurin" var størsta áttamannafarið á Eiði. Hann var hægri reistur enn hinir bátarnir, og hann hevur eisini avreitt tann størsta farmin, 4 4 4 4 pund. Teir plagdu at siga fýra fýratøl.

Eg havi einaferð verið á báti við Pól í Garði. Tað var á sumri í '47. Tá segði hann mær frá náttini á Beingjónni. Tað er eisini einasta ferð, eg eri farin gjøgnum holið í Kellingini. Pól segði, tá vit komu út við Romafles dygst við Kellingina: "Eg havi einaferð sum smádrongur verið við at dyrgt í gjøgnum Kellingina." "Íðan, so royna vit aftur", sigi eg. Hann segði ikki ímóti. So fóru vit eystur gjøgnum holið. Men lítlibátur fleyt ikki

Framhald á síðu 17

# Kunngerð

## Til løgtingsvalið 20. januar 2004 í Vága valdømi eru uppstillaðir hesir listar góðkendir av valnevndini:

**Listi A**
**Hin Føroyski Fólkaflokkurin:** (radikalt sjálvstýri)

Emmy H. Sandberg Joensen, fulltrúi, Miðvágur
Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, Sørvágur
Jóanis Nielsen, lærari, Sandavágur.

**Stillarar:**
Jákup á Stongum, arkitektur, Sørvágur
Randi Zachariassen, krambakvinna, Sørvágur
Anna Steintún, handilskvinna, Sørvágur
Torkil Haraldsen, lærari Sørvágur
Jógvan Hans Hansen, byggifrøðingur, Miðvágur
Niels Nattestad, bilmeknikari, Miðvágur
Albert Ellefsen, virkisleiðari, Miðvágur
Harald Johansen, stýrimaður, Miðvágur
Annika Gudmundsen, hjálpari, Sandavágur
Torkil Nielsen, avgreiðslumaður, Sandavágur
Albert Thomassen, bókhaldari, Sandavágur
Johnfinn á Plógv, byggimeistari, Sandavágur
Jón Joensen, bóndi, Bøur
Johannes Klein, alari, Vatnsoyrar
Hervør Hergudóttir, húsmóðir, Bøur.

**Listi B**
**Sambandsflokkurin:**

Marjus Dam, lækni og løgtingsmaður, Miðvágur
Sune Jacobsen, lærari, Sørvágur
Gunnar K. Nattestad, cand. merc. lesandi, Bøur
Rósa Samuelsen, borgarstjóri, Sandavágur

**Stillarar:**
Jákup Suni Lauritsen, byggifrøðingur, Sørvágur
Eivin Helgi Jacobsen, borgarstjóri, Sørvágur
Holgar Otto Tummas Jacobsen, bygningssnikkari, Sørv.
Kári í Haraldstovu Petersen, pilotur, Sørvágur
Eddie Lauritsen, bóndi, Mykines
Paula S. Nattestad, dagrøktarleiðari, Miðvágur
Marianna Simonsen, lærari, Miðvágur
Jónrith Frederiksen, húsmóðir, Miðvágur
Tórður Johannesen, skipari, Miðvágur
Ása Rasmussen, flakakvinna, Miðvágur
Dánial Christoffersen, bókhaldari, Sandavágur
Eivind Gudmundsen, maskinmaður, Sandavágur
Estrid Hansen, skrivstovukvinna, Sandavágur
Eyðgunn Hentze Rasmussen, skrivstovukvinna, Sandav.
Thurid Olsen, lærari, Sandavágur.

**Listi C**
**Javnaðarflokkurin:**

Kristoffur Gaardlykke, bilsmiður, Miðvágur
Edvard í Skorðini Joensen, blaðmaður, Sandavágur
Rasmus Niclasen, netumsitari, Sørvágur

**Stillarar:**
Alma Frederiksen, pensionistur, Miðvágur
Gudmund Gudmundsen, maskinmeistari, Sandavágur
Elita Falkvard, heilsuhjálpari, Sørvágur
Petur Leivur Davidsen, sjómaður, Miðvágur
Inga Joensen, handilskvinna, Sandavágur
Rasmus Mouritsen, arbeiðsmaður, Sørvágur
Jónhild Jørgensen, stuðulsfólk, Miðvágur
Peter Anderson, marinuspecialistur, Sandavágur
Oddmar Selfoss, telemontørur, Sørvágur
Thorborg Haraldsen, húsmóðir, Miðvágur
Inga Malena Samuelsen, sjúkrasystir, Sandavágur
Fróði Nolsøe, stýrimaður, Sørvágur
Kári á Presttrøðni, arbeiðsformaður, Miðvágur
Niels Olgar Joensen, bilstjóri, Sandavágur
Birgir Hansen, útróðrarmaður, Sørvágur.

**Listi D**
**Sjálvstýrisflokkurin:**

Oddmar Gudmundsen, húsavørður, Sandavágur
Sólvá Thomassen, stjóri, Sørvágur

**Stillarar:**
Conrad Lauritsen, skrivstovumaður, Sørvágur
Eyð Ellingsgaard, skrivstovukvinna, Sørvágur
Dánial P. Zachariasen, skipari, Sørvágur
Jórun Thomassen, húsmóðir, Sørvágur
Hjørleif Joensen, skrivstovumaður, Miðvágur
Halltóra Joensen, húsmóðir, Miðvágur
Albin Thomassen, múrari, Miðvágur
Rósely Reynstind Hansen, skrivstovukvinna, Miðvágur
Leivur Christiansen, stýrimaður, Miðvágur
Conny Christiansen, dagrøktari, Miðvágur
Annbritt Ellingsgaard, skrivstovukvinna, Sørvágur
Jónfríða Hansen, arbeiðskvinna, Sandavágur
Gutti Petersen, lærari, Sandavágur
Guðrun Joensen, flogterna, Sandavágur.

**Listi E**
**Tjóðveldisflokkurin:**

Tony Davidsen, snikkari, Sandavágur
Sólfríð Fjallsbak, sparikassanæmingur, Miðvágur
Hans Meinhard á Høgabóli, flogskipari, Miðvágur
Súni Selfoss, útvarpsteknikari, Sørvágur

**Stillarar:**
Sjúrður Guttesen, lærari, Sørvágur
Bogi Gaard Joensen, kokkur, Sørvágur
Jóannes Ortind, flogvallarumsjónarmaður, Sørvágur
Anna Sofía W. Thomassen, heimasjúkrasystir, Sørvágur
Jónvør Petersen, sjúkrahjálpari, Bøur
Jóhannes Dam Hansen, skrivstovumaður, Miðvágur
Mads K.M. Johannesen, AFIS leiðari, Miðvágur
Karl Mohr Johansen, málarameistari, Miðvágur
Tummas Lauritsen, arkitektur, Miðvágur
Anna Reynstind, húsmóðir, Miðvágur
Jógvan Sjúrður Hansen, maskinførari, Sandavágur
Kristianna Larsen á Lofti, skrivstovukvinna, Sandavágur
Regin á Lofti, arbeiðsformaður, Sandavágur
Maria Olsen, húsmóðir, Sandavágur.
Paula Vilhelmsen, krambakvinna, Sandavágur.

**Listi H**
**Miðflokkurin:**

Napoleon í Lon, krambakallur, Miðvágur
Mia av Kák Joensen, læraravikar, Sørvágur
Sonni Jacobsen, rithøvundur, Sørvágur

**Stillarar:**
Elisabeth H. Joensen, trafikassistentur, Sørvágur
Dagny Petersen, húsmóðir, Sørvágur
Hanna Nattestad, handilskvinna, Miðvágur
Joen P. Haraldsen, pensionist, Sørvágur
Sveinur Thomasen, bakari, Miðvágur
Esther Thomasen, hárfríðkanarkvinna, Miðvágur
Lona Johansen, skrivstovukvinna, Miðvágur
Dagfinn Petersen, umsjónarmaður, Miðvágur
Jacobina Petersen, handilskvinna, Miðvágur
Ludvig Jacobsen, pensionist, Miðvágur
Kirstin Jensen, sjúkrasystir, Sørvágur
Tór Ingar Akselsen, handilssveinur, Sandavágur
Vinjard Magnussen, málari, Sørvágur
Inga Magnussen, sjúkrasystranæmingur, Sørvágur.

**Listi K**
**Hin stuttligi flokkurin:**

Maria Matzen, námsfrøðingur, Hoyvík

**Stillarar:**
Aagi Niclasen, lærlingur, Miðvágur
Benni Haraldsen, skrellimaður, Miðvágur
Laila Vang Durhuus, húsmóðir, Miðvágur
Jens Elias Haraldsen, fiskimaður, Miðvágur
Eyðfríð Magnussen, húsmóðir, Miðvágur
Sjúrður R. Johansen, fiskimaður, Miðvágur
Hannvør T. Johansen, húsmóðir, Miðvágur
Leila Hannfríða Johansen, húsmóðir, Miðvágur
Bogi Emil Olsen, fiskimaður, Miðvágur
Jóhan Arni Hansen, arbeiðsmaður, Sandavágur
Tony Olsen, fiskimaður, Miðvágur
Arnhild Maria Poulsen, flakakvinna, Sørvágur
Thomar Suni Poulsen, arbeiðsmaður, Miðvágur
Janny Marina Haraldsen, húsmóðir, Miðvágur.

v/ løgtingsvalnevndina í Vága valdømi

Sigfríður Olsen
form.

## Finnur Fríði:

# Eitt framúr skip



*Aksel Mikkelsen er eisin ein av manningini.*

Beint undan jólum kom nýggi Finnur Fríði á Gøtu. Stór mannfjøld var á bryggjuni í Norðragøtu og tók ímóti. Her vóru fleiri røður hildnar. Ein av røðarunum var av Hargarð Tvørfoss, sum er sóknarformaður hjá FF í Gøtu. Hargarð er gamal fiskimaður - fór til skips fyri 50 árum síðan. So hann hevur upplivað eina menning í umstøðunum hjá fiskimonnum, sum er so stór, at tað ber illa til hjá teimum yngru at ímynda sær hana.

Hargarð segði:

"Tey byggja land, ið liva. Hesi orð runnu fram fyri meg, nú vit taka ímót hesum ómetaliga vakra skipi, og tankarnir leita meir enn hálva øld aftur í tíðina, tá eg fór mín fyrsta túr til skips á vári 1953. Hetta var ein ógvuliga fátækslig tíð í Føroyum. Verkfall var, bæði í 1953 og 1954. Sum vit sigldu norður gjøgnum Djúpini, stóð eg sum ein stórur smádrongur og lýddi á, meðan teir eldru viðgjørdu heimstrupulleikarnar. Ein, sum eg helt vera skilamann, gjørdi tað av, at tíðin var so ring, og hon varð ongantíð so fræg aftur, at ein ungur drongur kundi byggja sær hús. Hetta var ein dapur spádómur. Í dag kunnu vit bert gleðast um, at hann ikki gekk út.

Tá eg skal siga nakað um skipasøgu í Gøtu, so verður tað eftir tí, sum eg sjálvur minnist og havi hoyrt frásagt. Fyrsta farið, eg minnist er bygt í Gøtu, er seksæringurin Gøtu Tróndur. Hann varð bygdur í 1906 til at rógva til Havnar í handilsørindum og til grindarakstur. Her kann viðmerkjast, at einasti núlivandi persónur, sum eg veit hevur róð grindaróður við Gøtu Tróndi, er mamma reiðaran á hesum nýggja skipi, Hensia, tá hon sum 20 ára gomul genta saman við gøtumonnum róði av Skipanesi til Hvalvíkar í grind.

Tá talan er um um nótaveiðu við kraftblokki, hava gøtumenn altíð ligið í fremra enda. Longu í 1963 leigaðu Jóan Pauli Gregersen og synirnir "Ingrid Pau", ein danskan fiskibát. Teir settu kraftblokk í hann, og var eg sjálvur við hesum skipi. Tað gekk ikki væl at byrja við. Teir mistu tó ikki mótið, men keyptu eitt nýtt skip, "Saturn", saman við øðrum gøtumonnum og gjørdu hann út til nótaveiðu við kraftblokki. Við hesum skipi var eg í fleiri ár. Kraftblokkurin varð hildin at vera snildur tá, men hann kann als ikki sammetast við kraftblokkarnar í dag. Hann var bert eitt hjól, sum hekk uppi í einum bummi. Eg kann minnast, at tað var ofta tungt at fáa nótina inn aftur, tí tá tað rullaði illa, ók nótin eftir hjólinum. So funnu teir uppá, at ein maður skuldi upp á kraftblokkin at ganga, soleiðis at hann traðkaði nótina niður á blokkin, so hvørt tað varð drigið. Tá gekk frægari, men hetta var als ikki vandaleyst.

Skipini og amboðini í dag kunnu ikki samanberast við tey eldru skipini. Eg fari at nevna tey skip, sum hava verið í hesi vinnu og heimahoyrandi í Gøtu: Fyrst var tað Ingrid Pau, hóast skipið var danskt. Síðan kemur Saturn, Finnur Fríði, Geyti Reyði, Sjúrður Tollaksson, Jupiter 1 og Jupiter 2, Tróndur í Gøtu, Finnur Fríði 2, Saksaberg, og nú hetta veldiga skipið, sum vit síggja í dag. Eg fari at ynskja manning og reiðarínum hjartaliga tillukku við skipinum við at lesa ein sang, sum er gjørdur um húsið og heimið. Hann kann tó væl yvirførast til hetta skip, sum skal vera heim tykkara, meðan tit eru umborð.



*Tvær rættiligar fiskimannakonur: Anna Maria (t.h.) og Elita Thomsen.*

*Byggir ikki Harrin húsið,*
*virkast ei í Harrans frykt,*
*hvussu væl so enn er smíðað,*
*er tá alt til einkis bygt.*

*Varðar ikki Harrin staðin,*
*sum á fjallið bygdur er,*
*vakta vaktarmenn til einkis,*
*staðurin til grundar fer.*

*Lítið batar egin megi,*
*drúgva dagsins sleip og slit,*
*trúgv og treyst á Gud er leiðin,*
*Harrans frykt hitt sanna vit.*

*Tað ei vanst í egnum strevi,*
*Harrin vini sínum gav,*
*mangan tá á hvíldarlegu,*
*trygt í trúgv hann lá og svav.*

*Bygg tí Harri hetta húsið,*
*verj tú hendan veika flokk,*
*yvir okkum skrivað stendur:*
*Náði mín hon er tær nokk.*

*Finni Fríða vit ynskja eydnu og dýran fong,*
*má ævi tín vera ljós og long.*
*Til manning, sum her sítt dagsverk skal gera,*
*má Harrin signa og við tykkum vera.*

Hargarð hevur annars gjørt hetta yvirlit yvir skip, sum hava hoyrt heima í Gøtu í longri ella styttri tíðaskeið:

Ontaris, Tulip, Galathea, William Claus, Wilhelmina, Only Sister, Esther, Coralia, Tróndur í Gøtu (trolari), Gulenni, Leitið, Gøtunes (útróðrarbátur), Sporið 1, Báran, Fimm Systkin, Sporið 2, Saturn, Finnur Fríði 1, Finnur Fríði 2, Geyti Reyði, Jupiter 1, Jupiter 2, Sjúrður Tollaksson, Saksaberg, Tróndur í Gøtu, Ólavur Hvíti, Gáshólmur, Logos, Kristina Logos, Ólavur Gregersen, Skurin, Sirius og Leonora, sum varð keypt í Noregi, men ongantíð kom vegin fram. Og nú Finnur Fríði 3. Tilsamans er talan um 34 skip.

Vit vóru framsýningartúr við Finni Fríða, og hava vit nakrar myndir frá hesum túri.



*Andre saman við konuni Herborg. Hon er dóttir ein kendan fiskimann, Dánjal Johan Godtfred, og systir til aðrar fiskimenn.*



Martin Juel Jarnskor, uppilagstur fiskimaður og GÍ-ari.



Bankastjórin, Jørn Astrup Hansen, var eisini við saman við soninum Ebbe, sum var komin til Føroyar at halda jól. Ebbe arbeiðir á eini fóðurfyritøku.



Hargarð Tvørfoss, sum helt røðu, tá skipið kom.



Bogi Jacobsen í skiparastólinum.



Kvinnur eru aftan fyri alt. Her síggja vit frá vinstru Dagmar Jacobsen, Óluvu Tvørfoss, Halldóru Ranghamar, borgmeistara í Gøtu, Lauru Hentze og Annu Hansen.



Tað er vissuliga munur á umstøðunum í dag hjá fiskimonnum, og tá Hargarð og Óli fóru til skips í 50-unum.

Feðgarnir Kári og Jaspur Hansen, sum eru partaeigarar.



Anna Maria og John Jarnskor.





Meistarin, Símun Petur Vang Jacobsen.

# Hesir valevnislistar eru innkomnir og góðkendir í Norðstreymoy

## Listi A. Hin Føroyski Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri)

1. Ólavur Hansen, arbeiðsmaður, Kollafjørður
2. Ingi Olsen, bankamaður, Vestmanna
3. Heðin Zachariasen, borgarstjóri, Streymnes

Stillarar
Guðrun Øregaard, bókhaldari, Kollafjørður
Andrew Joensen, f.v. fiskimaður, Kollafjørður
Tummas V. Debess, lærari, Oyrareingir
Niels A. Mortensen, stjóri, Streymnes
Jóni Durhuus, timburmaður, Vestmanna
Ásmundur Dam, sjómaður, Kvívík
Tummas Bærentsen, bóndi, Kvívík
Jóanes Olsen, keypmaður, Hósvík
Sigtór Isaksen, bóndi, Tjørnuvík
Jan Klein, leiðari, Haldórsvík
Fríðálvur Bláhamar, yvirmek., Vestmanna
Knút Jacobsen, maskinførari, Hvalvík
Bjørgheðin Jacobsen, lærari, Langasandur
Kjartan Nielsen, teknikari, Vestmanna
Henry Christophersen, skipari, Vestmanna

## Listi B. Sambandsflokkurin

1. Asbjørn Djurhuus, skipari, Tjørnuvík
2. Olav Enomoto, systemútviklari, Vestmanna
3. Karina Fagralón, skrivstovukvinna, Kollafjørður
4. Bárður Nielsen, løgtingsmaður, Vestmanna

Stillarar
Albin S. E. Simonsen, skrivstovum., Vestmanna
Heðin Winther Olsen, skrivstovum., Vestmanna
Joen Pauli Johannesen, skipari, Vestmanna
Sigrið Petersen, vaskikona, Vestmanna
Páll Hellu, arbeiðsmaður, Vestmanna
Asbjørn K. J. á Válinum, Vestmanna
Boje Christensen, seniorsergent, Kvívík
Maria Hansen, sjúkrasystir, Vestmanna
Harriet Mortensen, skrivstovukv., Hósvík
Jacob Fuglø, postmaður, Hvalvík
Hansa A.S. Samuelsen, flakakv., Haldórsvík
Jens Jensen, løgreglum., Tjørnuvík
Terji Davidsen, tannlækni, Kollafjørður
Marner Tjørnudal, arbeiðsmaður, Signabøur
Otto Joensen, arbeiðsmaður, Kollafjørður

## Listi C. Javnaðarflokkurin

1. Hans Pauli Strøm, sosiologur, Vestmanna
2. Soffi Egholm, psykoterapeutur, Leynar
3. Gunnvá Mortensen, skrivari, Hósvík
4. Eddie H. Joensen, bóndi, Kollafjørður

Stillarar
Steinbjørn Magnussen, sjómaður, Tjørnuvík
Poul Grunnveit, borgarstjóri, Haldórsvík
Jónleif Samuelsen, arbeiðsm., Haldórsvík
Gunnar Joensen, sparikassam., Hvalvík
Signheðin Davidsen, stjóri, Hósvík
Eyðun Jensen, húsavørður, Kollafjørður
Heðin Hansen, arbeiðsm., Kollafjørður
Regin Djurhuus, arbeiðsm., Leynar
Petur Müller, pensiónistur, Kvívík
Súsanna Holm, pedagog, Kvívík
Sjúrður Ferja, lærari, Streymnes
Finnbogi Christiansen, arbeiðsm., Vestmanna
Ella Nielsen, vaskikona, Vestmanna
Jónolvur Andreasen, arbeiðsform., Vestmanna

## Listi D. Sjálvstýrisflokkurin

1. Jóanes N. Dalsgaard, samfelagsfr., Streymnes
2. Jónas Johnsson, fysioterapeutur, Kollafjørður
3. Hjalti Thomsen, næmingur, Vestmanna

Stillarar
Dávur Joensen, arbeiðsm., Hósvík
Joan Kallsoy Hammer, stuðul, Haldórsvík
Adolf Johannesen, virkisleiðari, Hósvík
Gunnvá Bjarkhamar, flakakvinna, Vestmanna
Marjun Thomassen, pensiónist, Streymnes
Tóri S. í Hoyvík, gartnari, Kvívík
Dávid Hansen, bókhaldari, Kvívík
Dia Hansen, arbeiðsm., Kollafjørður
Kaj Meinar Klein, málari, Vestmanna
Marjun Johannesen, skrivstovukv., Vestmanna
Kent Christensen, marknaðarl., Vestmanna
Johan Sommer Jacobsen, bilførari, Vestmanna
Jens Pauli Rein, servicetekn., Vestmanna
Karl Simonsen, fulltrúi, Vestmanna
Janus Johansen, bókavørður, Kollafjørður

## Listi E. Tjóðveldisflokkurin

1. Tórarinn Niclasen, lærari, Kvívík
2. Niklái Petersen, løgtingsmaður, Kollafjørður
3. Heidi Petersen, lærari, Vestmanna
4. Sunniva Kollslíð, skrivstovukvinna, Hvalvík

Stillarar
Øssur av Steinum, skúlastjóri, Kollafjørður
Øssur Olsen, timburmeistari, Hósvík
Hanna á Høgaryggi, húsmóðir, Hvalvík
Hjørleif Zachariassen, maskineigari, Streymnes
Karin Olsen, dagrøktarm., Tjørnuvík
Heðin Olsen, lærari, Haldórsvík
Maria Samuelsen, arbeiðskv., Kollafjørður
Høgni Joensen, arbeiðsm., Kollafjørður
Ludvík Christiansen, fangavørður, Stykkið
Faber Isaksen, timburm., Kvívík
Flóvin Joensen, maskinførari, Kvívík
Rodmund Magnussen, bilførari, Leynar
Finnbogi Joensen, umsjónarm., Vestmanna
Bjarni Heinesen, lærari, Vestmanna
Jógvan Durhuus, postmaður, Vestmanna

## Listi H. Miðflokkurin

1. Svein Askildsen, stjóri, Kollafjørður
2. Dánjal Petersen, trúboðari, Kollafjørður
3. Krista Poulsen, pedag.lesandi, Vestmanna

Stillarar
Magnus Pauli Johannesen, vrakari, Vestmanna
Johan Hendrik Hansen, sølum., Vestmanna
Elsi Christiansen, krambakv., Kvívík
Meta Askildsen, læknaskrivari, Kollafjørður
Jóhanna Jacobsen, listakv., Kollafjørður
Elsa Petersen, húsmóðir, Kollafjørður
Jonny Magnussen, heilsuatstøðingur, Tjørnuvík
Hjørdis Háberg Petersen, bankakv., Kollafjørður
Jógvan Johannesen, timburmaður, Vestmanna
Magni Christiansen, pedagoghj., Kvívk
Fríðbjørn Poulsen, elektrikkari, Vestmanna
Jón Miðberg, sølumaður, Vestmanna
Bina Miðberg, skrivstovukvinna, Vestmanna

## Listi K. Hin Stuttligi Flokkurin

1. Alex Dalsgaard, telvari, Kollafjørður

Stillarar
Una Simonsen, stuðul, Kollafjørður
Hans Kristian Simonsen, arbeiðsm., Kollafjørður
Jens Siggert Davidsen, timburm., Kollafjørður
Femja Petersen, lærlingur, Kollafjørður
Jaspur Joensen, net umsitari, Kollafjørður
Bogi Davidsen, timburlærlingur, Kollafjørður
Flemming Gullaksen, sjómaður, Kollafjørður
Marianna Gullaksen, heimagang., Kollafjørður
Bjørtfríð Magnussen, næmingur, Kollafjørður
Janus Skýlindal, næmingur, Kollafjørður
Eyðálvur Johannesen, arbeiðsm., Kollafjørður
Johan Dalsgaard, lesandi, Kollafjørður
Connie Dalsgaard, pedagog, Kollafjørður

*Vestmanna, 5. januar 2004*
*Løgtingsvalnevndin fyri Norðstreym*
*Birgir Waag Høgnesen, formaður*
*350 Vestmanna*

FFbladid
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
**Ring um lýsingar á tlf. 31 15 69**
**ella send eitt fax á 31 87 69**
gevur MEIRI fyri MINNI

*Framhald av síðu 12*

gjøgnum. So eg steig út á steinin, sum liggur har, og tók bátin tvørtur um. So kyrt var tann dagin.

Einaferð var Olivar á Mýrini á útróðri við "Hjallinum". Teir vóru úti um Longuna. Hann stóð og hótti á landnyrðingi. Teir høvdu ikki meir enn fingið línuna í botn, tá brann hann á við komandi eystfalli. Línan varð hespað innaftur í bátin. Nakað av fiski var á seinna enda. Teir settu á segl og nógv varð lagt til fyri at koma inn um eystfallið, áðrenn broddurin tók seg upp.

Olivur greiddi frá: "Tað fyrsta av eystfallinum er líka óslætt, sum sjálvur broddurin. Tá er tað smalri men óslættari. Eg var yngstur á bátinum, og eg varð settur til at hála livur til at stoyta út, tá ringast var. Vit fóru við strúkandi ferð inn vestureftir. Vit sóu einki fyri kavaroki, men vit hoyrdu sjóðið av broddinum, so nær honum vóru vit."

Her helt eg var nóg so nógv avgjørt av Olivari. Men eitt várið, vóru vit á veg til útróðrar við "Hjalli" - "Gimbrabátinum". Tað var mysingardagur, gott veður, men stóð høgt. Vit avgjørdu at steðga úti á Rivinum. Vit høvdu sløkt motorin og kastaðu, meðan vit bíðaðu.

Tá var knappliga eitt sjóð at hoyra, og vit hugdu upp í luftina. Hildu tað møguliga vera eitt flogfar, men so var ikki. Sjóðið kom úr sjónum, og áðrenn vit varnaðust nakað, vóru hesar stóru bleikingarnar av streymi. Vit settu í gongd og andøvdu okkum inn úr. Vit høvdu ongan vanda, men so ógvisliga og knappliga kann broddurin koma. Tá mintist eg Olivar og mátti sanna tað, hann segði um dagin við "Falkinum". Um sama dagin segði Olivar, at nógv fólk var komi út á Torvanes at hyggja eftir bátinum. Johan í Djónastovu, sum sá sera væl, rakti við bátin vestur undir Skorð. Hann peikaði eftir bátinum, so onkur annar skuldi raka við hann. Tá skuldi onkur gamal maður hava at honum og siga, at eingin peikar móti báti. Ja, mangt var til pátrúgv. Johan hevur eisini sagt frá einaferð, hann sum unglingi fór eftir torvi, og hann var komin niðan á Kroksgil, tá "Hjallurin" kom av útróðri. Hann segði, at báturin var fleiri ferðir burtur av so síðari aldu, tá hann kom heim millum Nesjana.

## "Nesbátur" (seinri)

Bátur nr. 11 er seinri "Nesbátur". Nesbátaneystið stóð har, sum bensinpumpurnar eru nú. Tað vendi eystur og vestur og var tvær bátslongdir langt.

Navnið fekk hin áður umtalaði "Nesbáturin" av tí, at hann varð keyptur uttan av Nesi. Sum áður sagt frá gekk hann burtur skírisaftan 1883. Henda seinna bátin lótu synir teirra, sum fórust við fyrra "Nesbáti" smíða. Her má ein sanna við skaldinum: "Teir vita til fulnar, um teir falla frá, so eru tó aðrir, sum halda á." Hesir vóru Jógvan úti í Húsinum og brøður hansara Kristoffur, Olivar og Sigmundur. Úr Miklagarði vóru Hans Martin, farbróður, Jóan Magnus, Andrias og Johannus. Teir í Miklagarði sótu í bakborð og hinir í stýriborð. Her var ein eitt sindur øðrvísi skipan enn vanligt. Jógvan úti í Húsinum var formaður. Men Hans Martin var eitt ættarlið eldri, so hann skipaði fyri í sigling og sat við segl sjálvur, og Jóan Magnus fór aftur at stýra, tá ið nakað var at. Johannus



*Málningur hjá eiðismanninum Niels Kruse, sum vísir útróðrarbátar koma aftur av havi.*

segði, at ikki var eitt øvugt orð fallið av Jógvani um tað. Men sum áður greitt frá, Jógvan var formaður. Hann mundi leggja nógv til. Tá eg smíðaði fyrsta seksæringin, var Sigmundur sjúkur, so hann hevði ikki verið til staðar, meðan báturin var laðaður upp. Hann kom inn, tá eg hevði sett rimina fyri. Tá hann kom inn, helt hann fyri, sum hann hugdi inni hetta stóra ílatið: "Tað hevði verið ringt at fingið Jógvan bróður at vent aftur í hesum." So stóran helt hann bátin vera! Sigmundur plagdi at siga við Johannus, at báturin gekk á bakborð. "Dugdi eg at smíða bát, skuldi hann ikki gingið á meg sjálvan, vit vóru so nógv sterkari," segði Johannus, tá teir skemtaðu. Vit høvdu ikki kunnað róð av makt, um báturin ikki gekk á okkum. Teir báðir høvdu altíð verið væl. Nú var Johannus vorðin gamal og var ikki so ofta uppi á verkstaðnum. Hann bað meg siga sær frá, um Sigmundur kom inn. Um Johannus



*Durhusneystið*



*Neystið hjá Jóan Fredrik (Falkurin)*



*Neystið hjá Grana*



*Neystið hjá Riddaranum og neystið hjá Falkinum.*



*Krusaneystið*

*Framhald á næstu síðu*

segði okkurt um bát, sum eg smíðaði, bað Sigmund hann ikki blanda seg uppí. Vit vóru til okkara tíð. Teir nýggju bátarnir eru betri enn teir gomlu. “Skamm fyri”, segði Johannus, “teir kunnu vera so breiðir uttan at hugsa um framdriftina.”

Teir høvdu ikki “Nesbátin” so leingi. Allir blivu skipsmenn við tíðini. Báturin varð seldur til Klaksvíkar um 1910. Ein dagin var tætt við, at tað kundi verið illa við “Nesbátinum”.

Johannes greiðir frá: “Tað var frískur høgættarvindur. Vit komu siglandi inn av havi við tungum báti. Jóan Magnus, bróður, stýrdi. Hans Martin, farbróður, sat við dragið. Hendan dagin var Jóan Fredrik gamli við okkum. Tað vildi so illa til, at tá ið Jóan Magnus skuldi taka bátin undan, tá reið tað um snarið, at róðurarmurin brotnaði um sjóðingina, so báturin rann skeivur í sjónum. Báturin var tungur. Allir róptu á farbróður um at lækka. Hann hevði lækkað, áðrenn vit fingu hesa ógvisligu rendina. Men hann vant seglið í topp, so báturin ikki misti ferðina, annars kundi hann sokkið. Men hann rann, inntil hann vendi uppí. “Eg minnist væl,” segði Sigmundur, “væl var Jóan Magnus lágur maður. Men hann tók hondina niður millum beinini um rongina. Tað fór sjógvur aftur av herunum á honum, og vit vóru omaná, tá ið avhasaði.” Teir høvdu jarnróðurarm. Gjáarmenn kallaðu jarnróðurarm fyri svoynkil.



*Sigmundur á Lofti*



*Fredrik er sonur Hanus hjá Fredrikki. Hann er elsti eiðismaður, 93 ár, og tann seinasti, sum livir eftir av teimum, sum hava roynt útróður við árum við áttamannafari. Anna, 87 ár, var gift við Lauritsi, beiggja Fredrik. Hann var við á túrinum við "Hvalinum" í 1948, sum var avgjørt seinasti útróðrartúrur við árum.*

### “Ebenezer”

Bátur nr. 12 var “Ebenes-er”. Eigari var Ólavur í Køkinum, og formaður Sigmundur á Lofti.

Tað var hátíðarligt, tá ið “Ebenezer” varð flotaður. Hann varð hátíðarliga doyptur. Ólavur yrkti eitt ørindi: “Jeg døber dig í salten vand, at du skal føre fisk på land, både store og fede, Ebenezer skal du hedde.” Menn spurdu Ólav í Køkinum hvat navnið “Ebenezer” merkti. Hann svaraði: “Hidentil har han hjulpet os”.

Eg veit so sera lítið um hendan bátin, hann hevur verið lítið umtalaður av monnum. Hann var tann seinasti av teim gomlu bátunum, sum teir roknaðu upp av áttamannaførunum. Eg veit heldur ikki allar mennirnar. Sigmundur á Lofti var formaður, so vóru tað synir Ólavs. Teir vóru Jóan Petur, Knút, Johannus, Anton og Olaf, so veit eg tíverri ikki meir. Um Ólavur sjálvur hevur róð við, veit eg ikki at siga. Hesin báturin man hava verið lítið brúktur til útróður. Allur várróður helt jú mest sum uppat, tá skotski trolaraflotin legði seg á miðini norðanfyri eftir aldaskiftið.

Eg havi hoyrt “Ebenezer” umtalaðan sum fjallbát. Johannus segði, at læntu teir sær fjallbát, so lat hagin eitt lamb. Men tað gamla var, at merkurnar skiftust um at lata bát. “Ebeneser” varð seldur til Gøtu.

Petur, lærarin í Lorvik, sum var ættaður úr Gøtu, hevur sagt, at hann sum ungur hevði verið á Eiði eftur bátinum.

### Ein lítil søga frá Óla á Seiðagjógv

Teir høvdu verið á fjalli í Miðhaga og vóru á veg norð við fullum báti av seyði. Tað var frískur vindur av útsynningi, um at taka leyst her norðuri á fjørðinum. Vit sigldu, so kom ein ordiliga frískur vindur.

Tann, sum sat við dragið, var ikki heilt einsamallur. Eg sá á atburðinum, at hann ætlaði ikki at lækka. Tá eg helt, hann hevði lagt nóg mikið fyri bátin, tók eg og rykti dragið frá honum, tó eg visti ikki, hvussu tað fór at spæla av. At kollsigla seg bar ikki til. Tá tók hann til: “Nú vart tú ræddur, lítli mín”. Eg segði einki, men hugsaði mítt. Tað er at ræðast, tá menn ikki eru við seg sjálvan og sita við segl.

### “Garðsbáturin”

Bátur nr. 13 er “Garðsbáturin”, eyknevndur “Luttur”. Býtið var so: 2 partar í mittasta Garði, 2 á Mýruni, 2 í Búrstovu, og Jákup og Jógvan 2 partar. Hann var grindabátur nr. 4 og partabátur. Teir, sum róðu við “Lutti”, vóru Jákup í Garði og Knút Petur, bróðir hansara, Marius og Petur í Búrstovu, Jákup og Jógvan hjá Dánjali, Hans Jákup og Pól á Mýruni. Hendan seinasta eri eg ikki heilt vísur í er rætt. “Luttur” var gongubátur burturav, og hann varð ikki tikin í róðri. Onkur hevur sagt til skemtunar: “Jákup hjá Dániali skuldi siga á meg: “Skal hann ikki”, og Petur skuldi siga á meg: “Skal hann heldur ikki.” Teir róðu í hvør sínum borði, og vildu ikki lata hin vinna á sær. Tí gekk “Luttur” so væl. Hann fekk motor og róð varð út við honum undir krígnum og aftaná. Eg vil halda, eg umvældi “Lutt” seinast í 50-unum. Tá hevði hann ein nýggjan FM-motor.

Einaferð hevði “Luttur” sett upp á Møl. Tað hendi seg, tá tað var kyrt, at bátur setti upp har. So stóð hann niðanfyri Malagarð um náttina. Hesa náttina var hann stokkin vesturum. Teir fóru tíðliga oman um morgunin at hyggja eftir bátinum. Vestan er sera ringur til hvirlur niðri á Møl. Tá ið teir komu oman, tók ein hvirla, sum kom heimeftur, bátin heim um garðin og breyt annað borðið. Áðrenn teir komu til, kom ein onnur hvirla omaneftir og tók bátin oman um garðin og breyt hitt borðið. Tá var ringt lag á Petur í Búrstovu. Hann skuldi siga: “Hann tók hann, sum átti hann.” Hann meinti Várharra. Tá vóru aðrir forherðingar, sum søgdu: “Teir høvdu so ikki býtt vestanættini bátspart. Tað skuldi verið nei.”

Mangur dagur hevur verið vánaligur, um teir eru komnir aftur. Einaferð kom Luttur aftur í so tjúkkum kavaroki, at fyrsta land, teir sóu, var Teistanoyragjógv, og har settu teir upp.

### “Laksurin”

Nu er so “Laksurin”, seksmannafarið hjá Jákup Paula í Hoygarði, eftir, sum hann og synir hansara róðu við. Teir vóru Andrias, Zakarias, Sofus og Sigurð. Eg havi ikki funnið fram til, hvør tann sætti maðurin hevur verið.

### “Hvalurin”

Tað er enn eitt áttamannafar, og tað er “Hvalurin” í Pálsstovu. Hann varð smíðaður, eftir at “Pálsstovubáturin” var settur. Hann var ongantíð taldur millum áttamannaførini, sum róðu út við fastari manning, og “Pálsstovubáturin” gekk bara eitt ella tvey ár eftir, at “Familjan” og “Nesbátur” vóru farnir at rógva. Tað var mestsum sama fólkið, sum mannaði teir nýggju bátarnar.

“Hvalurin” er seinasta áttamannafar, sum hevur verið á útróðri við árum. Tað var í 1947 um várið.

Johannus hjá Bartali hevði lænt bátin og fingið nakrar við sær. Frásøgumaður er Fredrik. Eg var ein og Laurits, bróður Niels á Dunganum, Hilmar undir Brekkuni, Kristian hjá Símuni, Pól Vesturdal og John í Garði. Av hesum er bara Fredrik eftir á lívi nú. Hann er 93 ára gamal.

### “Strandingur”

Eitt áttamannafar er enn, tað er Strandingur, smíðaður á Strondum. Tað var Sigmundur á Lofti, sum skipaði fyri tí. Hann og synir hansara, Jógvan og Jóan Petur, og Óla Jakup í Sandi (Magnussen). Hinir vóru Jóhan í Djónastovu og bróðursynir Sigmunds: Pól, Óli og Hans á Brúgv. Báturin kom til Oyrar við mjólkarbátinum. Vit fóru til gongu til Oyrar eftir honum. Í Norðskála møttu vit Dánjali í Suðurstovu. Vit spurdu, um hann hevði sæð bátin. Hann svaraði, “at tit koma norð til Eiðis, tað er lágætt og vestfall í Sundinum”. Hann helt ikki so nógv um dygdina á bátinum. Rætt hevði hann. “Strandingur” var sum ein fles at rógva, segði Johan í Djónastovu. Teir róðu dúgliga út við “Strandingi”, tá ið kolastreykan var í Skotlandi í 1928.

Undir seinna heimsbardaga fekk báturin motor og varð brúktur til útróður. Tá átti Pól á Brúgv bátin og kallaði hann “Vónin”.



*Hesin málningurin hjá Óla Egilstrøð gevur eina góða lýsing av bátum og neystum í tíðini, sum Símun Johan greiðir frá. Her gera teir klárt at kasta nót.*

Ein frásøgn eftir Johannus í Miklagarði er henda: "Undir fyrra heimsbardaga læntu vit eitt áttamannafar frá Gjógv. Eg var eftir bátinum saman við øðrum. Tá vit komu vestur eftir Botnaleitið tóktist aldan at vaksa. Hans Martin, farbróðir, helt fyri:"Vit fara úti á vestur fyri." Tað er úti á Stórugjógv, til Skarvagjógvin er komin frá fyri vestan og inn eftir Víkarnesi. Torvanes tá kalla vit at fara vestur fyri.

Tá ið vit komu vestur fyri, varð fasta stýrið sett fyri. Aldan var so stór, at tað vísti seg at vera trongligt at koma heim millum Nesjana. Tá var so nógv brim, at fleiri bátar máttu seta upp suðuri á Bakka.

"Fortunan" lendi samtíðis, sum vit máttu kasta fiskin niðan í neystið undan briminum. Vit sluppu upp á Eiði, men teir, sum komu aftaná okkum, sluppu ikki upp her, men máttu allir suður á Bakka (tað er suðuri undir bygdini við Ljósá). Hetta brimið varð kallað gandabrimið.


"Krusapakkhúsið" og neyst niðri á Hamri.

## Blíðskapur í Saksun

Jóhannus segði eisini frá pápabeiggja sínum, Hans Martini, at einaferð, teir vóru á útróðri vesturi í havi, kom so ringt veður av landnyrðingi, at teir vóru noyddir at seta upp í Saksun.

Saksuningar vóru komnir út á Lógv at taka ímóti bátum. Teir mundu vænta bátar at seta upp har tann dagin. Millum teir bátar, sum settu upp tann dagin, vórðu teir á Pálsstovubátinum og teir á einum tjørnuvíksbáti bodnir inn á Hvíggjarhamri. Teir vórðu so settir til borðs, sum tað sømdi seg einum bóndahúsi. Eiðismenn í stovuni og tjørnuvíkingar í roykstovuni. Táið teir høvdu etið, fór matmóðurin í ein kistil, sum stóð undir bíleggarovninum og gav teimun øllum hvør sínar tveingir. Teir vóru 16 mans, og bóndin fór upp á loftið og kom aftur við gamalseyðaroðum og leingjaði hvørjum manni til skógvar, og teir fingu nál og tráð at seyma við. Teir vóru sostatt skøddir og kundu ganga til Víkar. Tjørnuvíkingar gingu til Tjørnuvíkar og eiðismenn gingu til Víkar og vórðu settir yvir á Bakka. Jú, bøndurnir høvdu ofta víst sítt stóra sinnalag, táið á stóð.

Saksun var náttúruhavn fyrr í tíðini inntil kyndilsmessuna hørðu, sum hon hevur verið kallað til hendan dag. Tá legðist Lógvin upp, og enn í dag eitur tað millum eiðismenn vestur fyri Havnina.

## Lykt úr seyðaskinni

Ein lykt hoyrdi til hvønn bát. Tær høvdu í gomlum døgum bara ein rút, ein roðrút. Til roðrút varð nýtt skinnið av veðragjólvingi, sum var deyður í raki. Hann varð flettur og skinnið tambað út við at festa tað uppá ein skjøldur ella uppá ein hjall, til terri gjørdi tað so tunt, at tað dugdi til rút. Her í Miklagarði var ein lykt við roðrúti til, tá ið eg var smádrongur. Hon hevði hongsl gjørd úr horni, men er tíverri ikki varðveitt. Tey gomlu dugdu ikki at síggja virðið í tí gamla, tí er mangt kastað burtur, sum átti at verið varðveitt. Millum annað ein rakki, sum var í skapi sum ein hálv held. Rakkin fór úr brúki við teim gomlu vaðmalseglunum. Tey vóru so tung í vavi, tá ið sjógvur gekk á. Allir vóru betri nøgdir við handilsseglið.

Teir vóru glaðir at skifta við seglið, sum var sneitt undir ránni, sum teir kallaðu handilssegl, tí tað var úr stóti, sjálvt um teir seymaðu tey sjálvir. Sum áður sagt frá varð tað fyrsta seglið keypt fra gamla Dia á Vertshúsinum í Havn.

Áttamannafarssegl hevði reb undir ránni, og var tað til at gera tað beint undir ránni í undangongu. Eisini var reb í neðra, og har var lykkjan til at taka vindin úr seglinum, tá lækkað varð. Eisini var bóglina til hálsin til at kunna sigla neyvari, hon var bundin fram í stavn. Teir stóru bátarnir høvdu trý spenni á mastrini, tvey til gulborð og eitt í læ. Tað triðja kallaðu vit stakspenni og ein blokk til skeyti, so tað ikki sleitst av setningsringunum, sum vóru av jarni.

Tað kann tykjast løgið: Her vóru vanliga bara tvær fiskifjalir, tær vóru undir lærbekki og undir bógbekki og ikki undir rúmbekki, sum ein kundi hugsað. Tað var fyri at kunna leggja mastrina afturav bátinum. Í andróðri lá hon framav, so oysti hon so, tá báturin setti.


Mynd av Hamrinum á vetrardegi. Lossikranin varð settur upp av Krusehandlinum. Stóraneyst sæst høgrumenin á myndini.

## Agn

Agnið var, sum áður sagt, fyri tað mesta fiskaagn og steinbítur. Tað var góð steinbítaleið úti undir Kolli vestur úr Nevinum. Teir gomlu hildu steinbít vera illveðursfisk. Fekst nógvur steinbítur, so var uppiløgan vís, gágga var eisini. Tað er áhugavert, at teir søgdu, at gággan í Víkarbarmi fiskaði betri enn tann í Eiðisbarmi. Nú Magnus Heinason hevur gjørt kanningar er meira at dreggja eftir. Øða kom ikki fyrr enn seinni, tá trolararnir løgdu seg á miðini, og menn vóru varir við, hvussu fiskurin samlaði seg á gruggið í slóðina, har trolararnir høvdu gjørt sítt oyðandi verk.

Brislingur var eisini nógv nýttur um várarnar. Per á Mýruni átti brislinganót, og plagdu eldri menn og unglingar, sum ikki vóru farnir at rógva út, at kasta nót eftir brislingi. Tað hendi meir enn so, at gjáarmenn sótu við leypi og bíðaðu, tá teir komu aftur. Kontraktin var at lata ¾ kar til nótina. So býttu vit tað, ið eftir var, millum okkum, sum høvdu kastað, segði Jóhannus í Miklagarði frá. Hann mintist eisini, at hann fekk meira í part við at kasta nót, enn brøður hansara høvdu fingi í útróðri.

Her endar bátasøgan, sum hon er søgd mær frá gomlum eiðismonnum.

# Eyskarið

*Ein dagin, sum ættin at landinum bar,*
*eitt eyskar sum reki sást liggja.*
*Tað einaferð hoyrdi til áttamannafar,*
*var við teimum lívið at tryggja.*

*Um tað nú fekk orðið, hvat kundi tað sagt:*
*So mangan teir vóru í vanda;*
*at gripsborði løddir - Ja, nógv var tillagt,*
*søkkladnir teir komu til landa.*

*Í andróðursdøgum teir slitu upp land,*
*so sparrógvið - tigandi tora -*
*tá nógv stóð á nøglum og gav seg hvørt band,*
*jú, tá mundi EYSKARIÐ duga.*

*Og onkuntíð hendi, so illa stóð til,*
*at frá sást í bæði borð ganga.*
*Teir høvdu upp seglið og løgdu nógv til*
*og sigraðu stormin hin stranga.*

*Í tvørskipan sjógvurin nógvur gekk á*
*- í læborði tollarnir undir.*
*Tá nógv stóð á spennum og bognandi rá*
*- víst kendi tað ríkari stundir.*

*Nú nógv gekk á bátin, og oysast má meir,*
*her markið var, teir løgdu fyri:*
*Við farmi nóg mikið at oysa til tveir*
*jú, tá hevði EYSKARIÐ virði.*

*Hví lata í gloymskuna slíkan ein lut,*
*nú árar ei ríkja í homlu.*
*Tað hoyrdi menn syngja ein lovsang til Gud,*
*á útferð og heimferð - teir gomlu.*

*So harðbalt var lívið, teir høvdu tó mót,*
*á Harran so vildu teir vóna.*
*Teir vistu at hava sær vátt undir fót;*
*- vit ei tykkum gloyma, forfjóna.*

*Símun Johan Wolles*



– Góðgæti
– Vikubløð
– Soft ice
– Milk shake
– Bakaravørur
– og mangt annað
Kioskin hjá Ingu
v/ Ingu Joensen
Sandavágur – tlf. 333839

## Kanningin hjá útvarpinum:

# Víst eru fjølmiðlarnir óálítandi!

Nú um dagarnar endurgav útvarpið úrslitið av eini Gallup-kanning, har fólk vórðu spurd um fjølmiðlarnar. Tað var bert helvtin, sum metti teir at vera álítandi og yvir helvtin av teimum, sum høvdu eina meining um hetta, helt teir ikki viðgera evni nóg nágreiniliga og neyvt.

Hetta gav, sambært somu tíðindum, leiðslunum á stóru fjølmiðlunum høvuðbrýggj. Útvarpsstjórin helt, at teir royndu í hvussu er at tryggja sær, at tey tíðindi, UF bar vóru røtt. Hetta er uttan iva rætt, tá talan er um fiskaprísirnar á Toftum og slík tíðindi.

Men spurningurin er eins nógv tað, ið ikki verður lýst í fjølmiðlunum. Tá talan er um t.d. politiskan tíðindaflutning, so hava fólk alla grund til mistrúgv, sum vit hava víst á her í blaðnum nógvar ferðir.

Politiskur tíðindaflutningur (í Føroyum) snýr seg sum høvuðsreglu bert um at "endurgeva" og ikki um at "viðgera" politisku tíðindini. Á hendan hátt sleppa fjølmiðlarnir undan at leggja seg út í nakað tjak við politikkarar. Mannagongdin er tann, at um politikkari A sigur, at B lýgur, so verður hetta endurgivið. Sigur B hinvegin, at tað er A sum lýgur, verður hetta eisini endurgivið. Men eingin fer at kanna, hvør ið lýgur, tí so verður annar traðkaður á hælin. Og lurtarin/-lesarin er líka klókur aftaná.

### Fjølmiðlarnir eru til fals

Tað er eingin ivi um, at teir stóru fjølmiðlarnir fyri ein stóran part eru beinleiðis til fals og lata seg brúka av politikkarum - til villeiðing av borgarum, og til politisk endamál.

Eitt gott dømi er, tá Torbjørn Jacobsen undan seinasta vali í 2002 boðaði frá, at hann ikki ætlaði at stilla upp. Øll vita, at ein "maktgreðingur" sum TJ, kundi ikki droymt um at slept síni valdsstøðu. Júst sum tað kundi forútsíggjast, boðaði TJ frá eina viku seinni, at nú hevði hann fingið so nógvar áheitanir, at hann kendi seg noyddan at stilla upp kortini. Hetta er nú eitt gamalt nummar.

Og pínadoy, um TJ ikki ger sama nummarið eina ferð enn til hetta valið. Nú ráddi um at fáa kappingarneytar av listanum hjá flokkinum. So hann fær blást upp í øllum fjølmiðlum sum stórtíðindi, at hann heldur ikki hesa ferð stillar upp. Tað gekk eisini júst sum TJ hevði ætlað. Størsti kappingarneytin er burtur og TJ er nærum tryggjaður afturvali. Hetta er eitt ræðandi dømi um ússaligheit og undirbrotligheit hjá fjølmiðlum, ið halda seg vera professionellar.

Vanliga undanførslan hjá fjølmiðlunum er annars, at teimum tørvar pening og orku, og nú verður eisini nevnd eftirútbúgving. Hetta er tað reina tvætl. Tað hava ongantíð verið so nógv fólk og so nógvir pengar hjá stóru fjølmiðlunum, sum í dag. Her krevst bert vit, skil og heiðurligheit.

Tann veruligu trupulleikin er, at stóru fjølmiðlarnir eru meira at kalla "skøkjur", sum leggja seg undir tí fyrsta og besta. Og tað er eingin ivi, at tann fyrsti og besti er Høgni Hoydal og hansara hoff. Hesin bólkur er púra ókritiskt komin til orðanna í øllum fjølmiðlum, uttan so mikið sum ein nærgangandi spurning. Tað eru nógv dømi um hetta.

### Hava gjørt júst tað sama, sum teir ákæra løgmann fyri

Júst í hesum døgum verður H Hoydal í somu fjølmiðlum lýstur sum ein sannleiksapostul og verður hann m.a. endurgivin uttan viðmerkingar fyri síni sjónarmið um, at "Annfinn Kallsberg hevur logið um sína fortíð, meðan hann hevur verið løgmaður. Hann hevur ikki viljað lagt kortini á borðið og tikið greiða frástøðu frá lógarbrotum".

Hetta er eisini satt og má ljóða sum søtur musikkur í oyrunum á teimum, sum sakna reinleika í politikki.

Men sakin er bert tann, at í 2000 var ein "sak" í Tjóðveldisflokkinum. Tá gjørdu H Hoydal og T Jacobsen fullkomiliga tað sama, sum teir í dag leggja Anfinn Kallsberg undir. Nevniliga at lúgva um málið og at halda upplýsingum aftur, hóast páhald um, at øll kort vórðu løgd á borðið. Hesir kunnu á tí økinum í hvussu er ikki briksla nøkrum nakað sum helst.

Umrøddu ósannindi vórðu skjalprógvað í FF blaðnum 7. desember 2000.

Men hetta hevði ongan áhuga hjá stóru fjølmiðlunum. Sambært erkleraða prinsippinum hjá útvarpsstjóranum um, at trúvirðið í politiskum tíðindaskrivum ikki verður eftirkannað, fekk HH júst tey (ósonnu) tíðindini um hetta mál í allar fjølmiðlar, uttan í FF-blaðið!

Tískil kunnu hesar kreftir halda áfram við teirra dupultmorali og skinhelligheit, stuðlaðir av fjølmiðlum uttan hugburð. Teir hava lagt seg á støðið hjá politiskum skipanini. Hetta er ein av orsøkunum, at í føroyskum politikki er í dag einki mark fyri, hvat ið kann bera til.

### Sjálvrættvísi

Størsti trupulleikin við føroyskum fjølmiðlum er, at sambært teimum sjálvum hava teir altíð rætt. Tað er ikki komið fyri, at ein føroyskur journalistur hevur ásannað, at hann hevur mistikið seg. Hann er við sínu útbúgving tíðindi, og her skal maðurin á gøtuni bert halda kjaft, tí hesum hevur hann ikki skil fyri!

Og Gud náði tann, sum torir alment at siga nakað annað! Her hevur okkara prostitueraða pressa enntá fingið stuðul frá løgtingsins umboðsmanni. Hann hevur blástemplað allan tíðindaflutning uttan mun til innihald, og aftaná tey mál hann hevur avgreitt um tíðindaflutning, eru tað óráð at venda sær tann vegin.

Sum sagt: Úrslitið av veljarakanningini er púra rætt. Men her er als einki at vænta. Tað kann ikki roknast við, at tann sum fyrst hevur selt seg, fer at koma burtur úr tí aftur.

*Óli Jacobsen*


JARÐFRØÐISAVNIÐ
**Faroese Geological Survey**

Søkt verður eftir:

## Jarðfrøðingi / Jarðalisfrøðingi

- avloysarastarv á Jarðfrøðisavninum

Vegna barnsburðafarloyvi er eitt tíðaravmarkað starv sum jarðfrøðingur/jarðalisfrøðingur á Jarðfrøðisavninum leyst at seta frá 1. mars 2004 ella skjótast til ber.

Starvið
Jarðfrøðisavnið skipar fyri kanningararbeiðnum viðvíkjandi møguligum landgrunnskrøvum uttan fyri 200 fjórðingamarkið. Hetta arbeiði fór veruliga í gongd á vári 2003 í tøttum samstarvi við danska kanningarstovnin GEUS. Viðkomandi kemur at arbeiða í einum fjøltáttaðum og tvørfakligum umhvørvi við sambandi til heimligar og útlendskar myndugleikar og kanningarstovur. Uppgávur fevna eitt nú um innsavning og tulking av seismiskum og geokemiskum kanningartilfari.

Krøv til umsøkjaran
Setanin krevur eina vísindaliga útbúgving á universitetsstøði. Fyrimun hava umsøkjarar við royndum innan nýtslu av teldutøkni í sambandi við loysn av jarðfrøðiligum spurningum, góðum samstarvsevnum og fakligum smidleika.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsókn
Umsóknir skulu vera Jarðfrøðisavninum í hendi í seinasta lagi 1. februar 2004.

Adressan er: Jarðfrøðisavnið, postsmoga 3169, 110 Torshavn.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sigurð í Jákupsstovu á tlf. 357000 ella við telduposti til sigurd.i.jakupsstovu@jfs.fo

*Jarðfrøðisavnið er vísindaligur kanningarstovnur undir Oljumálaráðnum. Jarðfrøðisavnið hevur til endamáls at savna, varðveita, handfara og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu náttúruvirðum. Stovnurin skal virka fyri, at lóggáva og umsiting av jarðfrøðiligum náttúruvirðum verður grundað á framkomna og dagførda jarðfrøðiliga vitan.*



## Sjúkrarøktarfrøðingur

Deild M - Medicinsk seingjardeild

Søkt verður eftir avloysarum fyri sjúkrarøktarfrøðingar:

| | |
|---|---|
| Frá 01.03.04 til 15.10.04 | 32 tímar pr. viku í skiftandi vaktum |
| Frá 01.03.04 til 31.08.04 | 24 tímar pr. viku í skiftandi vaktum |
| Frá 01.04.04 til 31.10.04 | 32 tímar pr. viku í skiftandi vaktum |

Harumframt verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingi, heilsuatstøðingi ella sjúkrahjálpara frá 01.04.04 til 31.12.05 36 tímar pr viku í skiftandi vaktum.

Førleikakrøv
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga innan medicinska sjúkrarøkt
- Góð samstarvsevnir
- Ynskiligt er við royndum innan økið.

Setanartreytir
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Synnøvu Hansen, deildarleiðara telefon 45 54 63 lokal 403 ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lokal 106.

Umsókn við avriti av prógvi, autorisatión og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Klaksvíkar Sjúkrahús
Umsjónarmaðurin
FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 29. januar 2004 kk. 12:00.

Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík · Tlf: 45 54 63 · Fax: 45 73 63

# KUNNGERÐ

Hervið skal verða gjørt kunnugt, at hesir valevnislistar eru innkomnir til løgtingsvalið 20. januar 2004 og góðkendir:

## FÓLKAFLOKKURIN, LISTI A

**Valevnislisti**

Undirritaðu bjóða okkum fram sum valevni fyri ,,Hin føroyski Fólkaflokkurin" til løgtingsvalið í Sandoyar valdømi 20. januar 2004

**Valevnir**

Poul D. Klementsen, bóndi, Sandi
Óli Nolsøe, agronomur, Dali
Eyðvarur Petersen, skipari, Sandi
Julian Jón Thomsen, fiskiv. tøkn. Skopun

**Stillarar**

Tróndur Tronsesen, sjómaður, Skálavík
Elsa Maria Hentze, húsmóðir, Skálavík
Jógvan í Geil, sjómaður, Skopun
Kristian Hentze, arbeiðsmaður, Skopun
Hans Pauli Juul, lesandi, Skopun
Tórur Johannesen, oljusølumaður, Sandi
Jóan P. Clementsen, bátasmiður, Sandi
Bergur Olsen, sjómaður, Sandi
Jónsvein Thomsen, arbeiðsmaður, Sandi
Carl Johan Petersen, keypmaður, Sandi
Ottar Hentze, bóndi, Sandi
Bjarki Magnussen, sjómaður, Húsavík
Antines V. Magnussen, krambakallur, Húsavík
Sólvit Nolsøe, arbeiðsmaður, Dali
Meinhard Hentze, postmaður, Skúvoy

## SAMBANDSFLOKKURIN, LISTI B

**Valevnislisti**

Undirritaðu løgtingsveljarar bjóða okkum fram sum valevni fyri Sambandsflokkin í Sandoyar valdømi til løgtingsvalið 20. januar 2004:

**Valevnir:**

Terji Dalsgaard, bókhaldari, Sandi
Edmund Nielsen, navigatørur, Skopun
Eyðna Vidtfeldt, lesandi, Villingardalsvegi 1, kj. Tórshavn
Joen Peter Petersen, kokkur, Skálavík

**Stillarar:**

Jóhan Hentze, bygdarráðsformaður, Skúvoy
Jóanes Clementsen, arbeiðsmaður, Sandi
Jóhan Petur Kjærbo, bóndi, Skopun
Jensia Olsen, húsmóðir, Skálavík
Agnas Torsteinsdóttir Olsen, flakakvinna, Skálavík
Palli Olsen, froskmaður, Skálavík
Tórstein Christiansen, næmingur, Skálavík
Maj-Brit Lydersen, húsmóðir, Skálavík
Johannes Sørensen, bilførari, Sandi
Kartin Winther Olsen, fiskimaður, Skopun
Andrias K. Jensen, arbeiðsmaður, Skopun
Kristoffer Poulsen, fyrrv. keypmaður, Skopun
Alexander Jespersen, lærari, Sandi
Petur T. Poulsen, bankamaður, Skopun
Hjørmund F. Olsen, keypmaður, Húsavík

## FØROYA JAVNAÐARFLOKKUR, LISTI C

Undirritaðu bjóða seg hervið sum valevni, fyri Føroya Javnaðarflokk í Sandoyar valdømi, til løgtingsvalið, tann 20. januar 2004:

**Valevnir:**

Eyðstein Dalsgaard, skipari, Skálavík
Tummas Frank Joensen, sjómaður, Skúvoy
Gerhard Lognberg, løgtingsmaður, Skopun
Jákup Birgir Mohr, sýslufultrúi, Sandi

**Stillarar:**

Gustav Hentze, sjómaður, Sandi
Sólvit Simonsen, skipari, Sandi
Tórálvur Mohr Olsen, sjómaður, Sandi
William Sand Davidsen, timburmaður, Sandi
Martin Djurhuus, arbeiðsmaður, Skálavík
Ellintur Olsen, sjómaður, Skálavík
Anfin Johannesen, arbeiðsmaður, Dali
Steintór Djurhuus, eldri, sjómaður, Dali
Jógvan Adolf Johannsen, lærari, Dali
Terji Hansen, navigatørur, Skopun
Rósing Lydersen, sjómaður, Skopun
Olsvald Kjærbo, sjómaður, Skopun
Petur Hans Winther, eldri, sjómaður, Skopun
Elisabeth Joensen, húsmóðir, Skúvoy
Bjartur Tórarenni, sjómaður, Skúvoy

## SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN, LISTI D

Valevnir Sjálvstýrisfloksins í Sandoyar valdømi, til løgtingsvalið 20. januar 2004 undir bókstavinum D:

**Valevnir**

Símun Martin Johannes Nicolajsen, sjómaður, Skopun
Sæbjørn Magnusson Olsen, Skálavík
Eyðun Poulsen, sjómaður, Skopun
Torbjørn Poulsen, fyrrv. landsstýrismaður, Bóndabrekku 21, Tórshavn

**Stillarar**

Odvald Sømark, sjómaður, Skálavík
Ingigerð Poulsen, húsmóðir, Skopun
Tórálvur Poulsen, sjómaður, Skopun
Annié E. Jensen, húsmóðir, Skopun
Johanna Sømark, húsmóðir, Skálavik
Allan Munch, arbeiðsmaður, Skálavík
Hildibjørg Pedersen, húsmóðir, Skálavík
Hans L. Sømark, sjómaður, Skálavík
Bettina Sømark Nielsen, húsmóðir, Skálavík
Sanna Poulsen, húsmóðir, Skopun
Anna Kjartansdóttir, flakakvinna, Skopun
Katrina í Byrgi, húsmóðir, Skopun
Stanley Olsen, koyrilærari, Skopun
Ruth H. Olsen, húsmóðir, Skopun
Elisabeth Leo, húsmóðir, Skopun

## TJÓÐVELDISFLOKKURIN, LISTI E

Valevnis- og stillaralisti hjá Tjóðveldisflokkinum í Sandoyar sýslu til valið 20/1 - 2004

**Valevnir:**

Dánjal Jákup Jakobsen, maskinmaður, Skálavík
Maiken Krabenhøft, húsmóðir, Skopun
Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður, Sandi
Símun av Skarði, lærari, Sandi

**Stillarar:**

Annika Joensen, stuðulsfólk, Skopun
Jonhard Johannesen, skipsførari, Sandi
Harry Hentze, arbeiðsformaður, Skopun
Klæmint Myllhamar, fiskimaður, Skálavík
Torbjørn Jacobsen, fiskimaður, Skopun
Sverri Jacobsen, pensionistur, Húsavík
Fridrikka Jensen, stuðulsfólk, Sandi
Zakaris Stórá, navigatørur, Skopun
Lis Clementsen, skrivstovukvinna, Sandi
Rúni Hentze, skipsførari, Skopun
Marner Thomassen, maskinmaður, Sandi
Kjartan Midjord, arbeiðsmaður, Skálavík
J. Jákup Joensen, maskinmeistari, Sandi
Arthur Ryggstein, skipari, Skopun
Jacoba Løkjá, húsmóðir, Sandi

## MIÐFLOKKURIN, LISTI H

Miðflokkurin stillar hesi valevni upp, í Sandoyar valdømi, til løgtingsvalið 20. januar 2004

**Valevnir:**

Vagn í Geil, arbeiðsmaður, Reynstún 28, Argir
Dania Lamhauge, húsmóðir, Skopun
Petur E. Poulsen, røktari, Skopun

**Stillarar:**

Jógvan Lamhauge, arbeiðsmaður, Skopun
Bodil Hentze, húsmóðir, Skopun
Turid Winther, handilskvinna, Skopun
Sunneva Kjærbo, húsmóðir, Skopun
Gunhild Absalonsen, sjúkrahjálpari, Skopun
Sunrid Berg, sjúkrahjálpari, Skopun
Fríðfin Nicolajsen, arbeiðsmaður, Skopun
Einar Joensen, málarameistari, Skopun
Berit Joensen, krambakvinna, Skopun
Winnie Kjærbo, húsmóðir, Skopun
Kristvør Kolden, húsmóðir, Skopun
Sólvá Nielsen, arbeiðskvinna, Skopun
Helena Nielsen, sjúkrahjálpari, Skopun
Arndis J. Nicolajsen, heilsuhjálpari, Skopun

---

**F. Løgtingsvalnevndina fyri Sandoyar sýslu**
Bjarni Dalsgaard, form.
220 Skálavík, tann 5. januar 2004

**Løgtingsvalnevndin fyri Sandoyar sýslu**
Bjarni Dalsgaard
220 Skálavík, tann 4. januar 2004

## Tíðindaskriv:

# Verður ullin aftur gull?

Ásannandi at vit í Føroyum hava havt ein trupulleika av, at ullin ikki verður tikin upp og fingin til høldar, og sostatt liggur og sløðist til ampa fyri bæði fólk og fæ, setti landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum eftir áheitan frá vinnuni í oktober 2002 ein arbeiðsbólk at gera uppskot til eina skipan, sum hevði til endamáls at fáa ullina til høldar. Í arbeiðsbólkinum vóru umboð fyri Bóndafelagið, Óðalsfelagið, Jarðarráðið, Almennar Royndir og Ráðgeving, MBM og Vinnumálaráðið.

Endamálið við arbeiðinum hjá bólkinum var umframt at fáa ullina til høldar, eisini at betra um góðskuna av ullini og samstundis at økja um marknaðarvirðið á tilfeinginum, so at játtanin á fíggjarlógini so við og við gerst óneyðug.

Arbeiðsbólkurin gjørdi eitt álit, har mælt var til at seta ullamóttøkur á stovn, sum skuldu savna ullina saman, turka og flokka hana. Fyri at fáa gongd í innsavnanina var mælt til at lata eina stuðulsjáttan í eitt 5 ára skeið.

Landstýrismaðurin valdi at fylgja álitinum og lat eina játtan á fíggjarlógini fyri 2003, sum skuldi umsitast av Almennum Royndum og Ráðgeving. Alm. Royndir og Ráðg. lýsti síðan eftir ullamóttøkum og setti í juni 2003 tvær, eina í Vági og eina í Gøtu.

Ullin er savnað inn, ullamóttøkurnar hava latið nakað fyri ullina, umframt at seyðaánarnir hava fingið 4,- kr. í stuðuli fyri kg, og 2,- kr. kg í flutningsstuðli, har ikki landfast er. Alm. Royndir og Ráðg. hevur umsitið og ávíst stuðulsjáttanina, meðan ullamóttøkurnar hava savnað ullina inn og fingið hana til høldar.

Arbeiðsbólkurin væntaði at kunna savna um 50 tons av ull um árið, men sum sæst í niðan-fyristandandi talvu, komu uml. 58 tons inn í 2003 - og eru umboðini í arbeiðsbólkinum fegin um, at tiltakið er so væl móttikið av seyðaánarunum. Mesta ullin í mun til áseyðatalið, er komin inn í Streymoy og Suðuroy, meira enn eitt kg. pr. áseyð.

Vónandi fer væleydnaða tiltakið at eggja teimum til, ið ikki tóku undir við tí í 2003. Hetta skuldi so ført við sær, at ullin í framtíðini ikki kemur at vera til ampa, men heldur til nyttu, og kanska kemur aftur til sín rætt, so gamla orðatakið "ull er Føroya Gull" aftur kann verða nýtt.


JARÐFRØÐISAVNIÐ
Faroese Geological Survey

Søkt verður eftir:

Jarðfrøðingi / Jarðalisfrøðingi

Eitt starv sum jarðfrøðingur/jarðalisfrøðingur á Jarðfrøðisavninum er leyst at seta frá 1. mars 2004 ella skjótast til ber.

Starvið
Setanin er á kanningardeildini á Jarðfrøðisavninum. Her kemur viðkomandi at arbeiða í einum fjøltáttaðum og tvørfakligum umhvørvi í tøttum tilknýti til oljufeløg og mynduleikar. Uppgávur fevna eitt nú um tulking av seismiskum og petrofysiskum kanningartilfari frá oljuleitingunum.

Krøv til umsøkjaran
Setanin krevur eina vísindaliga útbúgving á universitetsstøði. Fyrimun hava umsøkjarar við royndum innan nýtslu av teldutøkni í sambandi við loysn av jarðfrøðiligum spurningum, við góðum samstarvsevnum og fakligum smidleika.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsókn
Umsóknir skulu vera Jarðfrøðisavninum í hendi í seinasta lagi 1. februar 2004.

Adressan er: Jarðfrøðisavnið, postsmoga 3169, 110 Torshavn.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sigurð í Jákupsstovu á tlf. 357000 ella við telduposti til sigurd.i.jakupsstovu@jfs.fo

*Jarðfrøðisavnið er vísindaligur kanningarstovnur undir Oljumálaráðnum. Jarðfrøðisavnið hevur til endamáls at savna, varðveita, handfara og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu náttúruvirðum. Stovnurin skal virka fyri, at lóggáva og umsiting av jarðfrøðiligum náttúruvirðum verður grundað á framkomna og dagførda jarðfrøðiliga vitan.*



Blákrossheimið

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

***Vit kunnu m.a. bjóða...***

- ***avrúsan og viðgerð***
- ***einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)***
- ***samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)***
- ***eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi***

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

***Vit vilja fegin hjálpa tær***

**Blákrossheimið** FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 Tlf. 31 55 75






Við okkurt um 25.000 ymiskum vørum á hyllunum, stendur landsins størsta goymsla av eykalutum til taks hjá føroyska flotanum. Aftanfyri stendur eitt samtak av trimum føroyskum skipasmiðjum og einum mekaniskum verkstaði, ið hevur meir enn seksti ára royndir innan veitingar til skipaflotan – alt frá smærri umvælingum og viðlíkahaldi til um- og nýbygging av skipum.

Góðkendir tænastuveitarar av:
Wärtsilä
Deutz-MWM
Scania & Valmet
Callesen
Ulstein Brattvaag
ABB-Turbochargers
Desmi pumpum

stephanssons hús

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
Tlf. +298 31 11 55
Fax +298 31 11 25
e-mail: info@faroeyard.fo

**P/F Skipasmiðjan á Skála**
Tlf. +298 44 11 55
Fax +298 31 44 25
e-mail: skala@faroeyard.fo

**Vestmanna Skipasmiðja**
Tlf. +298 42 40 10
Fax +298 42 40 05

**Runavíkar Mekaniski Verkstaður**
Tlf. +298 44 70 36
Fax +298 44 78 34

**www.faroeyard.fo**

# Bjargingarútgerð

## á sjógvi og landi

*Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð.*
*Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".*





- Bjargingarbátar
- Bjargingarnet
- Yvirlivilsisdraktir
- Flótidraktir
- Bjargingarvestar
- Bjargingarkransar
- Epirbar/neyðsendarar
- Radartranspondarar
- Eldsløkkjarar
- Eldávaringar
- Branddraktir
- Umvælingar
- Eftirlit

**P/F Gummibátatænastan**
Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo

# Skal skipið vaskast?

**Tosið fyrst við EYSTUROYAR REINGERÐ**

- Serkunnleiki innan vasking av aptering
- Vasking av maskinrúmi
- Reinsa teppi
- Bona gólv
- Reinsa koyggju og forheng
- Reinsa gamalt bonivoks
- Seyma nýggj forheng
- Útvega máttur, brúsuforheng, voksdúkar v.m.
- Brúsubakkar "Homequeen vinyl"
- Eisini leggja vit nýtt linoleum ella teppi á dúrkið

**Eysturoyar Reingerð**
Postboks 41 · FO-650 Toftir · tlf./fax: 44 89 88
fartlf: 22 53 50 · teldupostur: nch@post.olivant.fo

# MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64

we make fishing more profitable



**Vit framleiða og umvæla øll sløg av trolum, so sum:**
- Rækjutrol
- Botntrol
- Flótitrol
- Semipelagisk trol

**Vit framleiða og umvæla snurpunótir til:**
- Lodnu
- Makrel
- Sild

**Vit framleiða og umvæla nótir til alivinnuna umframt:**
- Vaska og impregnera nótir
- Levera komplettar fortoyningar, akker, tog o.a.

**Annars hava vit alla útgerð til trol, nótir og alivinnuna**

**VÓNIN LTD.**

**Høvuðsskrivstova:**
Vónin P/F
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 444 246
Telefax 444 579
www.vonin.com

**Tórshavn:**
Álaker
Telefon 35 43 91
Telefax 31 33 19

**Miðvágur:**
Telefon 33 29 46



# Vit hava stórt úrval av reiðskapi til línuveiðu

**Vit framleiða:**
Flótilínu ◆ Spunpolyesterlínu ◆ Reyða línu
Terylene/Danlinelínu ◆ Reina Terylenelínu
Hvítar, reyðar, bláar og svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast órippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

◆◆◆vælkomin inn á gólvið

**SNØRISVIRKIÐ**
í Klaksvík
Tel. 455254 - Fax 457254
www.snorisvirkid.fo

**TEYMAVIRKIÐ**
í Runavík
Tel. 473000 - Fax 473001
www.teymavirkid.fo

# Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

**Sp/f Contrive Jsp Ltd.**
FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945

# KUNNGERÐ

Til løgtingsvalið hin 20. januar 2004 eru hesir valevnislistar innkomnir og góðkendir í Norðoya Valdømi:

**Listi A:**
**HIN FØROYSKI FÓLKAFLOKKURIN**
**(Radikalt Sjálvstýri)**

Petur Hans Joensen, lærari, Klaksvík
Anfinn Kallsberg, løgmaður, Viðareiði
Jógvan við Keldu, løgtingsmaður, Klaksvík
Jákup Mikkelsen, løgtingsmaður, Klaksvík
Ólavur Poulsen, skipari, Klaksvík
Rúna Sivertsen, blaðkvinna, Klaksvík

***Stillarar:***

*Hanus S. Hansen, bóndi, Hattarvík*
*Poul Johannes Simonsen, skipari, Hvannasund*
*Sven Hansen, fiskimaður, Norðdepil*
*Niels J. M. Absalonsen, bóndi, Viðareiði*
*Mikkjal á Bergi, skrivstovumaður, Klaksvík*
*Óli á Geilini, arbeiðsmaður, Svínoy*
*Heini á Marknagili, stýrimaður, Klaksvík*
*Sigmar A. Høgnesen, skipari, Norðoyri*
*Herfrí Sørensen, sparikassakvinna, Mikladalur*
*Oluf P. Joensen, skrivstovumaður, Klaksvík*
*Páll Sørensen, elektrikari, Húsar*
*Jógvan Lütsen, útgerðarmaður, Klaksvík*
*Elin Joensen, pensionistur, Klaksvík*
*Jan Petersen, fíggjarleiðari, Klaksvík*
*Bogi Simonsen, skrivstovumaður, Klaksvík*

---

**Listi B:**
**SAMBANDSFLOKKURIN**

Erikka Elttør, krambakvinna, Klaksvík
John Kári Jacobsen, skipari, Hvannasund
Karl Olgar Joensen, skipari, Klaksvík
John William Joensen, prentari, Klaksvík
Bjørn Kalsø, lærari, Syðradalur
Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, Streymnes
Jákup Meinhardt Hansen, skipsførari, Klaksvík

***Stillarar:***

*Marita Krosstein, krambakvinna, Klaksvík*
*Elsebeth Klakkstein, jarðarmóðir, Klaksvík*
*Margee Dam, kosmetolog/massør, Klaksvík*
*Rannvá Hansen, húsmóðir, Klaksvík*
*Sámal Christiansen, skrivstovumaður, Klaksvík*
*Elisabeth Joensen, lærari, Klaksvík*
*Tróndur Sivertsen, sjómaður, Norðdepil*
*Andreas S. Nýggjagarð, sjómaður, Hvannasund*
*Jákup Martin Poulsen, alari, Hvannasund*
*Símun Esmar Høgnesen, bóndi Húsar*
*Jógvan Eirik Jónsson, jarnsmiðjur, Húsar*
*Hanna Magnusson, lærari, Haraldssund*
*Kári Joensen, arbeiðsmaður, Klaksvík*
*Durita Joensen, krambakvinna, Kráarg., Klaksvík*
*Finn Hansen, maskinsmiðjur, Klaksvík*

---

**Listi C:**
**FØROYA JAVNAÐARFLOKKUR**

Jákup á Fløtti Jacobsen, løgreglumaður, Klaksvík
Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, Klaksvík
Tummas J. Lervig, maskinmaður, Klaksvík
Jógvan Páll Poulsen, skipari, Kirkja
Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur, Klaksvík
Torleif Sigurðsson, býráðslimur, Klaksvík
Mamy Dahl Sørensen, heilsurøktari, Viðareiði

***Stillarar:***

*Kjartan Ziska Jacobsen, pensionistur, Klaksvík*
*Svanhild Isaksen, fulltrúi, Klaksvík*
*Andrias L. Sørensen, arbeiðsmaður, Hvannasund*
*Jóna Olsen, fyristøðukvinna, Klaksvík*
*Bjarni Jacobsen, lærari, Klaksvík*
*Kristina D. Sjóstein, hjálparfólk, Viðareiði*
*Leif W. Høgnesen, keypmaður, Klaksvík*
*Joen Hendrik Henriksen, arbeiðsmaður, Mikladalur*
*Marianna Rasmussen, skrivstovukvinna, Klaksvík*
*Anna Svøðstein, húsmóðir, Kunoy*
*Sólarn Isaksen, bilførari, Húsar*
*Sigrid J. Mikkelsen, næmingur, Klaksvík*
*Jeanne Rubeksen, húsmóðir, Norðdepil*
*Heðin Ferja Heldarskarð, stálsmiðjur, Klaksvík*
*Heðin Klein, lærari, Klaksvík*

---

**Listi D:**
**SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN**

Eyðun Elttør, landstýrismaður, Klaksvík
Kristian Eli Zachariasen, system kominstrator, Klaksvík
Svein Rógvi Nielsen, venjari, Klaksvík
Jóannes Bólstein, fiskimaður, Klaksvík
Ólavur Waag Høgnesen, samfelagsfrøðingur, Klaksvík
Gullborg Christiansen, handilskvinna, Norðdepil
Sigvald Zachariassen, leiðari, Streymnes

***Stillarar:***

*Karl Heri Joensen, býráðslimur, Klaksvík*
*Ruth Johannesen, skrivstovukvinna, Klaksvík*
*Maiken Skarðenni, skrivstovukvinna, Klaksvík*
*Jørgin Johannesen, arbeiðsmaður, Klaksvík*
*Petur Simonsen, sølumaður, Klaksvík*
*Borgarhjørt Sólstein, húsmóðir, Klaksvík*
*Jákup Dion Frederiksen, lærari, Klaksvík*
*Andrias Josephsen, timburmaður, Klaksvík*
*Jógvan Clementsen, fyrrv. býráðsskrivari, Klaksvík*
*Sjúrður Klakk, handilsmaður, Klaksvík*
*Jógvan Jacobsen, arbeiðsmaður, Klaksvík*
*Helena Klein Pætursdóttir, leiðari, Klaksvík*
*Guttorm Klein, linjumontørur, Klaksvík*
*Jan Asbjørnson Joensen, kt-mennari, Klaksvík*
*Schumann Hansen, avgreiðsluleiðari, Klaksvík*

---

**Listi E:**
**TJÓÐVELDISFLOKKURIN**

Rani Nolsøe, býráðslimur, Klaksvík
Hanus Hansen, lækni, Klaksvík
Signy Hansen, flakakvinna, Klaksvík
Olga Biskopstø, samfelagsfrøðingur, Klaksvík
Karsten Hansen, f.v. landstýrismaður, Klaksvík
Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, Kunoy
Jancy Biskopstø Klein, sosialdeildarleiðari, Norðoyri

***Stillarar:***

*Hans J. Justesen, elverksmaður, Klaksvík*
*Poul Jakop Joensen, sjómaður, Klaksvík*
*Olfert Hansen, útróðrarmaður, Hvannasund*
*Julian Jakobsen, arbeiðsmaður, Klaksvík*
*Hans Jacob Sivertsen, fiskimaður, Norðdepil*
*Tórbjørn Bringsberg, handilsmaður, Klaksvík*
*Heini S. Glerfoss, arbeiðsmaður, Mikladalur*
*Oddny Simonsen, arbeiðskvinna, Klaksvík*
*Hemming Petersen, linjumaður, Klaksvík*
*Jørleif Syderbø, elektrikari, Húsar*
*Torkil Heinesen, el-innl., Klaksvík*
*Finn Baldvinsson, heilsølumaður, Klaksvík*
*Jón Harald Poulsen, maskinførari, Klaksvík*
*Jórun Høgnesen, lærari, Klaksvík*
*Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, Klaksvík*

---

**Listi H:**
**MIÐFLOKKURIN**

Eivinn Fróði Bringsberg, málari, Klaksvík
Jógvan Mortensen, pedagogur, Klaksvík
Emly K. Petersen, pedagog hjálpari, Klaksvík
Poul Nicolai Steinberg, útróðrarmaður, Klaksvík
Fimmbogi M. Poulsen, arbeiðsmaður, Hvannasund

***Stillarar:***

*Lena A. Heinesen, stuðulsfólk, Viðareiði*
*Jónfríða Justesen, flakakvinna, Klaksvík*
*Ingeborg Poulsen, dagrøktari, Hvannasund*
*Annika Brynjar, sjúkrasystir, Hvannasund*
*Kári Müller Jacobsen, málari, Klaksvík*
*Anna Jacobsen, skrivstovukvinna, Klaksvík*
*Irdi L. Jacobsen, dagrøktari, Klaksvík*
*Pól Thomsen, fiskimaður, Hvannasund*
*Sylvia Thomsen, húsmóðir, Hvannasund*
*Elbjørg Johannesen, húsmóðir, Klaksvík*
*Absalon Østerø, stjóri, Klaksvík*
*Asta Lydersen,varaleiðari, Klaksvík*
*Valborg Kjælnes, húsmóðir, Klaksvík*
*Kári Østerø, ped. hjálparfólk, Klaksvík*
*Sámal E. Akursmørk, gólváleggjari, Klaksvík*

---

**Listi K:**
**HIN STUTTLIGI FLOKKURIN**

Vivian Guðmundsson, pedagogur, Tórshavn

***Stillarar:***

*Hans Petur Joensen, maskinmeistari, Klaksvík*
*Valborg Heldarskarð Josephsen, sjúkrasystir, Klaksvík*
*Nanna Samuelsen, húsmóðir, Klaksvík*
*Súni Svabo Samuelsen, lærari, Klaksvík*
*Joan Heinesen, lesandi, Klaksvík*
*Vivian Bjartalíð, lesandi, Klaksvík*
*Jógvan Heinesen, lesandi, Klaksvík*
*Sigrid Súsanna Sivertsen, pedagoghjálpari, Klaksvík*
*Josias Hansen, fiskimaður, Klaksvík*
*Carl Gustav Gislason, arbeiðsmaður, Norðoyri*

---

***Klaksvík, hin 5. januar 2004***

**LØGTINGSVALNEVNDIN**
**FYRI NORÐOYA VALDØMI**

*Finn Kjølbro, formaður*
*Mamy Dahl Sørensen*
*Jákup Olsen*

# KUNNGERÐ

## Til Løgtingsvalið hin 20 januar 2004 eru hesir vallistar innkomnir og góðkendir

### LISTI A. HIN FØROYSKI FÓLKAFLOKKURIN
(radikalt sjálvstýri)

**Valevni:**
Sølvi Andreasen, býráðslimur, Vágur
Bergur Bærendsen, stjóri, Øravíkarlíð
Anna Djurhuus, heilsurøktarfr. Porkeri
Niels Pauli Hammer, sjómaður, Hvalba
Heri Hjelm, stjóri, Vágur
Uni Jacobsen, skipsførari, Tvøroyri
Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, Akrar

**Stillara:**
Jákup Olsen, fyrrv. reiðari, Vágur
Poul Johannus Joensen, býráðslimur, Vágur
Mourits Joensen, skipari, Vágur
Eli Poulsen, sjómaður, Sumba
Christian Jacobsen, pensionistur, Sandvík
Eyðun Ásason, tónleikari, Tvøroyri
Anna Maria Larsen, húsmóður, Fámjin
Hans N. Ziskasen, virkiseigari, Vágur
Gunnleif Midjord, bilførari, Vágur
Viberg Sørensen, skipari, Trongisvág
Daniel Jacob Poulsen, skipari, Hvalba
Tórhallur Randrup, skipari, Hvalba
Finnbjørn Nielsen, stýrimaður, Trongisvág
Astrid Vestergaard, heilsurøktarfr. Trongisvág
Niels Petur Nolsøe, lærari, Vágur

### LISTI B. SAMBANDSFLOKKURIN

**Valevni:**
Zakarias Bech, skipari, Porkeri
Svenning Borg, stýrimaður, Vágur
Johan Dahl, stjóri, Vágur
Finnleif Guttesen, meistari, Tvøroyri
Marjun Olsen, sjúkrahjálpari, Øravíkarlíð
Jaspur Vang, politistur, Tvøroyri
Otto West, elektrikari, Hvalba

**Stillara:**
Even Toftheyggj, bankamaður, Hvalba
Sverri Jacobsen, sjómaður, Sandvík
Súnhild Holm, vinnurekandi, Tvøroyri
Nauja Heilmann, pedagogur, Tvøroyri
Sofus Strøm, lærari, Trongisvágur
Johannus Magnussen, politistur, Tvøroyri
Jaspur Magnussen, maskinmeistari, Fámjin
Poul Midjord, keypmaður, Hov
Joan Bech, húsmóður, Porkeri
Flemming Michelsen, pensionistur, Vágur
Diana Muller, lærarinna, Vágur
Jens Sivar Djurhuus, lærlingur, Vágur
Ásgerð Stenberg, vinnurekandi, Vágur
Niclas Hentze, sjómaður, Sumba
Adreas Danielsen, navigatørur, Sumba

### LISTI C. JAVNAÐARFLOKKURIN

**Valevni:**
Jóannes Eidisgaard, løgtingsmaður, Tvøroyri
Rúni Lisberg, arbeiðsmaður, Sumba
Sverri I. Midjord, býráðslimur, Tvøroyri
Jastrid Nielsen, sjúkrasystir, Famjin
Nita Næs, lærari, Hvalba
Hendrik Old, løgtingsmaður, Vágur
Mikkjal Sørensen, stjóri, Porkeri

**Stillara:**
Jacob Poulsen, borgarstjóri, Sumba
Elisabeth M. Olsen, húsmóðir, Tvøroyri
Hans Vang, timburmaður, Tvøroyri
Karin Johansen, húsmóðir, Hovi
Knút Nielsen, maskinsmiður, Vágur
Kirstin Ellendersen, húsmóðir, Famjin
Trygvi Midjord, bilførati Hvalba
Niclas Sigurheim, arbeiðismaður, Sandvík
Eliesar Poulsen, arbeiðsmaður, Hvalba
Jákup Jensen, lærari, Tvøroyri
Zakarias Muller, pensionistur, Porkeri
Hilmar Bech, fyrrv. lærari, Porkeri
Fredrik Ludvig, pensionistur, Vágur
Poula Strøm, húsmóðir, Vágur
Eddie Bech, linjumaður, Lopra

### LISTI D. SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

**Valevni:**
Milson Berg, fiskimaður, Trongisvágur
Rúni Jacobsen, stýrimaður, Tvøroyri
Sonni Djurhuus, lærari, Tórshavn

**Stillara:**
Signy Berg, húsmóður, Trongisvágur
Kaj Ljósstein, skipari, Porkeri
Alvi Hjelm, skipari, Vágur
Dánjal Jacobsen, fiskimaður, Froðba
Esther Jacobsen, flakakvinna, Froðba
Eyðstein Lyngvej, trukkførari, Froðba
Ingolf Joensen, rørsmiður, Vágur
Tordis Lyngvej, dagrøktarmamma, Froðba
HervørSvalbard, heilsurøktari, Froðba
Jonna Mortensen, pensionister, Tvøroyri
Tummas Niclasen, maskinmaður, Tvøroyri
Birna Johannesen, heimahjálp, Trongisvágur
Elisabeth Danielsen, húsmóður, Sumba
Frank Robertson, arbeiðsmaður, Tvøroyri
Ann L. Poulsen, stuðul, Sandvík

### LISTI E. TJÓVELDISFLOKKURIN

**Valevni:**
Poul Erik Jacobsen, stýrimaður, Sumba
Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, Vági
Annlis Bjarkhamar, lærari, Vági
Johanna í Ólavsstovu, deildarleiðari, Øravík
Dan Nielsen, býráðslimur, Trongisvági
Ólavur Rasmussen, prestur, Hvalba

**Stillara:**
Eivind Bech, kokkur, Lopra
Mathilda Benjardøgg, húsmóðir, Vági
Arni D. Brattaberg, sølumaður, Vági
Sveinbjørn Dánjalsson, sjómaður, Hvalba
Oddur Dimon, kondittari, Tvøroyri
Kjartan Nielsen, arbeiðsmaður, Famjin
Frits Poulsen, bygningssnikkari, Sumba
Elias Joensen, fyrrv. maskinmaður, Vági
Jóhannis A. Joensen, arbeiðsmaður, Froðba
Sigmund Poulsen, fyrrv. Skipari, Sandvík
Marner Tausen, lærari, Porkeri
Erland Poulsen, sjómaður, Økrum
Hentzar Petersen, virkisleiðari, Hovi
Randi Petersen, postavgreiðslukvinna, Hvalba
Hjørleif Enni, pensionistur, Tvøroyri

### LISTI H. MIÐFLOKKURIN

**Valevni:**
Sigmund Andreasen, skipari, Vági
Anna S. Dam, krambakvinna, Porkeri
Kjartein Stórhamar Danielsen, lærlingur, Tórshavn
John Nielsen, Stjóri, Hoyvík
Petur Karl av Rana, bóndi, Trongisvagur

**Stillara:**
Tom Danielsen, maskinmeistari, Trongisvágur
Jórun Johannesen, húsmóður, Trongisvágur
Eyðun Guðlokkur Svalbard, arbeiðsmaður, Tvøroyri
Paula Svalbard Jespersen, húsmóðir, Froðba
Hervør H. Leo, vaskikona Froðba
Sigrid Ludvig, flakakvinna, Tvøroyri
Elinborg Thomsen, húsmóðir, Hvalba
Mirjam Jensen, flakakvinna, Hvalba
Laila Tiheleari, húsmóðir, Hvalba
Eingrím Holm, pensionist, Vágur
Andrew Kjærbo, kioskanari, Sumbøur
Sjúrður Dam, sjómaður, Porkeri
Marsanna Hjørdisdóttir Heinesen, húsmóðir, Vágur

### LISTI K. HIN STUTTLIGI FLOKKURIN

**Valevni:**
Connie Dalsgaard, pædagog, Kollafjørður

**Stillara:**
Krisyian Holm Stórhamar, maskinm., Trongisvágur
Sunneva Hammer, økshjalpari, Trongisvágur
Esmar Sørensen, lærlingur, Tvøroyri
Gunnar Olsen, maskinmeistari, Trongisvágur
John Berg Park, skipari, Froðba
Petur Holm Stórhamar, skipari, Trongisvágur
Magnus Olsen, skipari, Tvøroyri
Gudrun Emilia Joan Olsen, skipsterna, Tvøroyri
Niels Pauli Holm, maskinmeistari, Tvøroyri
Mathias Lassen, maskinmeistari, Hvalba
Annie Næs Lassen, krambakvinna, Hvalba
John Næs Berg, lærari, Hvalba
Álvur Næs Berg, maskinmeistari, Hvalba

**Løgtingsvalnevndin fyri Suðuroyar valdømi**

*Páll Joensen formaður*

# Val av limum til UMBOÐSRÁÐIÐ fyri OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

- **Í februar mánaði ár 2004 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Valið er galdandi í fýra ár.**

Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2004.

Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum og tess dótturfeløgum.

- **Allir tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F eru limir í felagnum.**

Ognarfelag Tryggingartakaranna er eitt felag við avmarkaðari ábyrgd, hvørs endamál millum annað er, beinleiðis ella gjøgnum annað felag, at eiga partapening í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og øðrum feløgum og annað íløguvirksemi.

Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi.

Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavíst 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni.

Tórshavn, 8. januar 2004
**Ognarfelag Tryggingartakaranna**
**Stjórnin**

OGNARFELAG
TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · P.O.Box 329 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel+298 345600 · Fax+298 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo





# Triðja bøn

Verði vilji tín sum í himli so á jørð!
Matt. 6,10

Hendir Guds vilji ikki av sær sjálvum?
Jú, men bara í himlinum.
Í himlinum standa einglarnir altíð glaðir og lýdnir til reiðar at fremja Guds vilja. Teir elska veruliga Gud, og harvið vilja hansara, hóast teir møguliga ikki altíð skilja hann. Tað er ógjørligt at hugsa sær ein eingil, sum hálvhjartaður, súrur og tvørur kennir seg noyddan at gera Guds vilja, grenjandi um, at tað altíð skal vera hann.

Í heiminum hendir Guds vilji ikki av sær sjálvum, tí her er so nógv, sum stríðir ímóti honum. Mannahjartað er syndugt og harvið sjálvsøkið, so tað ynskir sín vilja framdan og ikki fyrst og fremst Guds.

Djevulin og heimurin eru óndir og fremja ikki Guds vilja - tvørturímóti.
Menniskju kunnu "elska" Guds vilja, so leingi tey eru samd við hann, "skilja" hann og so leingi tey síggja, hann er teimum at gagni. Men so heldur ikki longur.

Hetta er ikki nóg mikið fyri Gudi, sum vil, at vit elska hann og eru honum lýðin eins og Ábraham, ið eftir Guds vilja vildi ofra sonin, uttan at skilja tað, ella spyrja um hví. Ábraham elskaði Gud og gjørdi tí vilja hansara og var eins og barnið, ið einans spyr eftir faðirsins vilja - uttan nakra frágreiðing.

Eitt hjarta, ið veruliga elskar Gud og vil gera vilja hansara, fáa vit bert við, at vit við dópi og trúgv eru fødd av nýggjum, fødd omanfrá, og Guds andi harvið hevur tikið bústað í hjartanum.

Tá verður Jesus og blóð hansara, ið reinsar frá allari synd, hjartans dýrasti skattur. Tá føðist bønin: - Jesus, frelsari mín, hvussu kann eg liva tær til vildar og tokka? Tá verður dagliga biðið av hjarta: Verði vilji tín sum í himli so á jørð!

Luther sigur í viðm. til triðju bøn:
Guds vilji er tann besti; tí biðja vit Gud um at geva okkum tað hjartalagið, sum fegið vil gera honum til vildar og í tolni líða tað, ið hann vil. "Gud geri tykkum fulldugandi í øllum góðum, til at gera vilja hansara, við tað at hann virkar í okkum tað, sum tekkiligt er fyri ásjón hansara, við Jesusi Kristi"-Heb.13,21

*Styrk meg, Gud faðir, so glaður tín vilja eg geri,*
*elski títt orð og tín heiður um bygdir út beri;*
*likam og sál, hugur og verk várt og mál*
*altíð til vildar tær veri!*

*Slb.397*


**Eg ynski at gerast haldari av FF-blaðnum fyri bert 50 krónur um ársfjórðingin**

Verður sent ópostað
(vit gjalda postgjald)

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur:

**FF-blaðið - postsmoga 58 - FO-110 Tórshavn**

**Vit eru at hitta á tlf. 31 15 69 ella ff-blad@post.olivant.fo**



**Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur**

frá SAHVA verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 3. februar og á Landssjúkrahúsinum 4. og 5. februar 2004.

Tíð fæst við at ringja á tlf. 45 54 63, mánadag og týsdag kl. 10 - 12, í seinasta lagi 27. januar 2004.

Klaksvíkar Sjúkrahús

**Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

**Vit útvega eisini:**
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

... sjálvandi til besta prísin !!

DANAK
DNV

**FARPACK**

Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com

# Valstríð uttan viðgerð av grundtrupulleikum

Ein skuldi kanska trúð at soleiðis sum løgtingsvalið varð útskrivað, skuldi fremsta evnið uppundir valið verið okkara politiska/umsitingarliga skipan.

Tað er jú fullkomiliga greitt, at her ruggar ikki alt, sum tað skal. Politiska skipanin skuldi í hvussu er kunnað verið samd um eina mannagongd, sum veruliga fær fólk at hava álit á hana aftur.

Í staðin síggja vit eitt léttisoppakent valstríð, sum tykist at vera grundað á, at fólk eru "býtt".

Tann, ið veruliga kennir politisku skipanina veit, at tað sum kemur fram eru frasir og flosklar, sum púra einki er aftanfyri. Tann veruligi trupulleikin í samfelagnum verður als ikki tikin uppá tungu. Nevniliga, hvat ið er galið við okkara politisku skipan, tá gangast kann sum uppundir hetta valið..

Hetta hava vit lýst her í blaðnum so væl, sum nakað kann lýsast. Tað verður eisini gjørt í dag við endurgeving av samandráttinum av okkara ársfrágreiðing, har vit vísa á, hvussu rættarloysi er almenni politikkurin.

Samanumtikið kann sigast:

### Løgmansembætið fungerar ikki

Tað er púra greitt hjá tí, sum fylgir nakað sum helst við, at við verandi løgmanni hevur embætið ikki verið røkt. Í landsstýrinum hevur als ikki verið nøkur leiðsla. Stórt sæð øll hava gjørt, sum tey vilja, og tí hevur landsstýrið ikki virkað sum ein eind. Hevur løgmaður gjørt ein vørr, hevur tað verið fyri at røkja floksbpolitisk endamál. Eftirlitsskyldan hjá løgmanni av landsstýrismonnum hevur verið tilvildarlig, alt eftir hvønn og hvat, tað hevur snúð seg um.

Lógarumsiting hevur verið eftir prinsippinum: "Går den, så går den", har allar meginreglur innan umsiting hava verið settar til viks. Tí hevur ongantíð verið nær til so ringt skil á umsitingini, sum í dag - uttan at løgmaður hevur rætt hond frá síðu.

### Umsitingarliga leiðslan virkar ikki

Høvdu vit so av illum havt eina leiðslu av umsitingini, men hon er líka dán. Nú er so lætt at geva Normann Christensen skuldina fyri støðuna. Men hansara skipan kundi bert virka, um tað var ein leiðsla, sum syrgdi fyri, at hon virkaði. Hendan leiðslan skuldi liggja í løgmansstjórastarvinum. Men hetta hevur bert verið ein viðfáningur, sum ikki hevur evnað at fáa tær mest grundleggjandi funktiónirnar í umsitingini at virka.

### Løgfrøði til fals

Alt hetta hevur ført til, at einki er sum eitur løgfrøði í almennu umsitingini. Tað, sum telur er "politiski viljin", og so er at fáa onkran løgfrøðing at leggja navn til. Hetta hevur gjørt, at tað er dagligur kostur, at grundleggjandi rættarprinsipp verða sett til viks - og rættartrygdin í samfelagnum er har eftir.

### Óbrúkiligt løgting

Í dag kann bert staðfestast, at hugskotið hjá Finnboga Ísaksyni at bøta um tingarbeiðið við at geva tingmonnum hægri løn og betri umstøður, var eitt feilskot.

Løgtingsarbeiðið er ikki øðrvísi enn í einum vánaligum kommunustýri. Eftirlitisarbeiðið hjá løgtinginum er púra einki vert og tað sindrið, sum skal eitast at vera , er bert eitt spæl fyri gallarínum.

Her er andstøðan einki mætari enn samgongan. So vánalig sum hon er sum andstøða, kann neyvan roknast við, at hon verður nakað sum helst frægari sum møgulig samgonga.

Tí kann tað gera stórt sæð gera tað sama, hvønn ein velur!

*ó.*

# FF-blaðið

Vitja heimasíðuna: www.fiskimannafelag.fo



**Tilboðsferðir**

frá Atlantic Airways



**Vikuskiftisferð Vágar - Aberdeen**

**1.479,-**
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald.

Bílegging áðrenn 12/3 2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 15/1 til 22/3 2004.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn 2-15). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í mesta lagi burtur í 3 dagar. Fráferð skal verða fríggjadag - heimferðin skal vera sunnudag.



**Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar**

**1.860,-**
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur afturat prísinum.

Bílegging áðrenn 20/3 2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 8/1 -29/3 2004.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn 2-15). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferð skal verða hósdag, fríggjadag ella leygardag. Heimferð skal verða sunnudag ella mánadag.

**Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar**

**2.360,-**
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur afturat prísinum.

Bílegging áðrenn 20/3 2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 8/1 - 29/3 2004

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn 2-15). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 14 dagar.

**Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum.**

Vanligir ferðaseðlar kunnu bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo

SANSIR 355 355

**Línubustir og goggar**

Hondbundin føroysk línubust og hondgjørdir goggarar



Verða sendar um alt landið

**Bílegging:**
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97

**Fløttislið** (limur í Føroya blindafelag)

FF blaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna - Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar Tlf: 311569

# Føðingardagurin hjá Jonu

Tann 4. januar fylti Jona Henriksen 80 ár, og varð dagurin hildin í KFUK. Her sást rættiliga, hvussu væl umtókt Jona er - og tað av góðum grundum. Er tað nakar, sum hevur ofrað seg fyri síni medmenniskju, so er tað Jona.

Hetta kom eisini fram á føðingardegnum, har fitt av fólki var samankomið, ið umboðaðu alla breiddina í samfelagnum, frá skótum og prestum til politikkarar úr ymiskum flokkum.

Vit á FF vilja eisini ynskja Jonu tillukku. Vit hava kenst í ártíggir, og Jona er framvegis eins og áður ein vælkomin gestur á Bryggjubakka.

Vit hava nakrar mynd frá føðingardegnum. Á forsíðuni síggja vit Jonu saman við trimum fittum smágentum sum hon er abbasystir at. Tær eru Lív, Rannvá og teirra diddan, sum ikki enn er doypt. Foreldrini eru Sóley og Bogi Henriksen.



*Millum gestirnar vóru teir í sangbólkinum "Teir fýra", sum munnu vera eini 320 ár tilsamans. Teir settu eisini sín dám á dagin. Allir eru teir gamlir fiskimenn. Teir eru f.v. Sverri Mortensen, Enok Dam, Thomas Thomassen og Kristoffur Joensen.*



*Jona saman við systkinabarninum Gunnleivi Mouritsen.*



*Tvey kend andlit í Havn: Haldur hjá "Katrinu Christiansen" og Asta "Kioskin á Vaglinum."*



*Tær sum stákaðust í køkinum skulu ikki gloymast. Her síggja vit f.v. Emmy Poulsen og Rigmor Mortensen.*




**Drongurin við pápan:**
- Eg skal heilsa frá Niels Jensen. Tit gingu í sama klassa í skúlanum.
- Niels Jensen?
- Ja, ein lítil, skallutur maður við fullskeggi…
- Nei-nei, tað var eingin skallutur við fullskeggi í mínum klassa…

*****

**Konan við mannin:**
- Jens, vit eru noydd at fara til lækna við lítla Peri, hann hevur so ilt í búkinum.
- Ja, men tað hevur hann havt fyrr…
- Ja, men ongantíð í summarferiuni!!!

*****

**Konan við mannin:**
- Var tað ikki í dag, at øll í firmanum fingu testað intelligensin?
- Jú.
- Bleivst tú eisini testaður? Og hvussu gekk tað?
- Lat meg siga tað soleiðis, at eg eri glaður fyri, at eg sjálvur eigi firmaið…

*****

**Far upp í politikk**
Svágur mín fór fyri nøkrum árum síðani upp í politikk.
Ja, og hvat ger hann nú?
Einki. Hann varð valdur!

*****

Um eg innflyti ein bát og taki allar tollarnar úr - er báturin so tollfríur?

*****

**Stjórin við skrivstovumannin:**
- Hvat plagar tú at gera sunnudagar?
- Einki!
- Tað hugsaði eg nokk. So vil eg fegin gera tygum varugan við, at tað ikki er sunnudagur í dag.